Nr. 16 • februar 2013

# MIÐ & MAGN

Føroya Skipara- og Navigatørfelag & Maskinmeistarafelagið



**ÚTGEVARI**
Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag geva MIÐ & MAGN út í felag.
Blaðið verður sent limunum.
4 útgávur eru um árið.

**BLAÐNEVND**
Páll Hansen (ábyrgd)
Regin Nónstein
Eyðstein Djurhuus
Jóan Petur Patursson

**MASKINMEISTARAFELAGIÐ**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Telefon 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

**FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG**
Jekaragøta 10
Postboks 248
110 Tórshavn
Telefon: 31 69 73
Teldupostur: fsn@fsn.fo

**BLAÐHALD**
Tey, sum ynskja at halda MIÐ & MAGN, kunnu boða frá hesum í teldupost til:
bladhald@midogmagn.fo
Haldara gjaldið er 200,- kr. um árið; t.v.s. 4 bløð.

**ENDURGEVING**
Tað er loyvt at endurgeva tekst úr MIÐ & MAGN, tá keldan verður upplýst.
MIÐ & MAGN kann heintast í PDF á heimasíðunum hjá feløgunum:
www.mf.fo
www.fsn.fo

**FORSÍÐUMYND**
Vindmyllur vera settar upp á Eystnesi.

**UMSITING**
Sp/f MEDIA
info@midogmagn.fo

**UMBRÓTING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ**
Føroyaprent · www.foroyaprent.fo

UPPLAG: 1900


# Sáttmálar, avtalur o.a. í 2013



Nú eru skjótt tvey ár liðin síðani Føroya Reiðarafelagið fall í dvala. Men fyri stuttum frættist, at menn høvdu tikið sær um reiggj, og hava lýst eftir stjóra til Reiðarafelagið.

Sum skilst verður kortini ikki riðið sama dag, sum saðla verður. Vit fara kortini at taka væl ímóti nýggja stjóranum, og loyva okkum longu nú at ynskja honum alt tað besta. Vit síggja spentir fram til eitt gott og gevandi samstarv.

Sáttmálasamráðingar fyri fiskiflotan byrjaðu um hálvan januar, og hava higartil gingið væl.

Nýggjar avtalur eru longu gjørdar fyri verksmiðjutrolarar og línuskip, og samráðingar eru við hinar bólkarnar.

Aðrar avtalur halda fram til nýggjar avtalur eru gjørdar. Her kunnu vit skoyta uppí, at – av serligum grundum – er avtalan við nótaskipini framlongd.

1. oktober gongur sáttmálin hjá Maskinmeistarafelagnum við Fíggjarmálaráðið og KAF út. Ein afturvendandi trupulleiki her er umflokkingar. Støðan hjá Lønardeildini er, at hesar skulu gerast í sáttmálaskeiðnum. Tá kann roknast við, at ein endaleys forhálingsprosses ferð í gongd.

Sáttmálin við „Reiðarafelagið fyri farmaskip“ gongur út 1. mars; farið er eisini undir tær samráðingarnar. Lat okkum her nevna, at skal FAS-flotin ikki avfólkast fyri føroyingar, so skal ein týðandi lønarhækking til. Ein trupulleiki á hesum øki er skattalóggávan. Man kann gott siga, at tá flatskatturin kom bleiv hýran hjá hesum monnum devaluerað. At lønarlagið er lægri enn í okkara grannalondum er tí ein stórur trupulleiki í hesi vinnu.

Tann 1. januar í ár kom lóg um hvíldartíð hjá sjófólki í gildi, hendan lóg er ikki galdandi fyri fiskiskip. Men okkara FAS-floti hevur longu siglt í fleiri ár við hesum hvíldarreglum og allir føringar, sum sigla uttanlands kenna væl hesar reglur, og arbeiða hvønn dag eftir teimum.

Men her í okkara egna dunnuhyli hava trupulleikar tikið seg upp hjá Strandfaraskipum Landsins.

Tað løgna í hesum sambandi er, at okkara lóggevandi myndugleiki heldur, at teir kunnu gera undantøk frá hesum reglum í staðin fyri at ganga undan, sum ein góð fyrimynd. Her er ein freist, sum gongur út 1. apríl, so enn ber til at finna brúkiligar loysnir.

Sáttmálin millum Skipara- og Navigatørfelagið og Fíggjarmálaráðið gekk út í oktobur í fjør, men enn er ikki komið á mál, so striltið gongst.

Stutt fyri jól skrivaðu fleiri fakfeløg undir keypssáttmála um at keypa helmingin av Tryggingarfelagnum LÍV. Skipara- og Navigatørfelagið og Maskinmeistarafelagið eru millum hesi feløg. Mangt bendir á, at yvirtøkudagurin verður einaferð í mars. Men her mugu feløgini gera sær greitt, at man kemur ikki til búgvið borð, her verður hugsað um at finnast skulu fólk til at manna ymsar nevndir.

*Vegna Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið*
*Páll Hansen, ábyrgdarblaðstjóri*







# Innihaldsyvirlit

Aðalfundur í Føroya Skipara og Navigatørfelag . . . . .4
Lívið tengt at sjónum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .12
Mouritz Mohr: Gestarøðari . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .13
Hátíðarhald og próvhandan. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .14
Stórur upsastovnur tryggjar ikki tilgongdina . . . . . .16
Annfinn Garðalíð: Lívið umborð . . . . . . . . . . . . . . . .20
Fiskivinnupolitikkur:
Nýskipan av fiskiveiðulóggávuni. . . . . . . . . . . . . . . . .21
Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum. . . . . . . . . . . . .26
Tíðindi frá Skipara- og Navigatørfelagnum. . . . . . . .28
Trúfastur altíð var maður . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .30
IRF: Nýtt spilloljuverk. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .34
Føðingardagar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .37
Tommy Petersen í spennandi starvi í Jerusalem . . . .38
Tryggingarfelagið LÍV. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .40











*Eystein Djurhuus*

# AÐALFUNDUR Í FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG

Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevði aðalfund á Hotel Føroyum 28. desember 2012 við hesi dagsskrá:

1. Val av fundarstjóra
2. Frágreiðing formansins um virki felagsins í farna ári
3. Framløga og støðutakan til roknskapin
4. Val av nevndarlimum
5. Val av grannskoðara og tiltaksmanni
6. Ásetan av limagjaldi
7. Ymiskt

Gestarøðari var Kári Petersen, búskaparfrøðingur.

Í formansfrágreiðing síni segði Eyðstein Djurhuus m.a.

## BOTNFISKAVEIÐAN

Botnfiskaveiðan við Føroyar er framvegis á einum sera lágum støði. Lítið hevur verið at fingið av toski og hýsu í fleiri fylgjandi ár. Í ár er so upsaveiðan eisini minkað nógv. Hetta er hent, hóast fiskidagarnir eru nógv skerdir og víttfevnandi økisfriðingar eru settar í verk. Sera nógv av smáum toski var inni við land fyri 2-3 árum síðani. Stór øki vóru stongd, fyri at tryggja, at hesin fiskur skuldi fáa frið at vaksa, fyri síðani at koma inní fiskiskapin seinni. Higartil hava vit einki sæð aftur til allan henda toskin, sum skuldi goymast til seinni. Vónandi kemur hann einaferð. Føroya Banki hevur verið stongdur nú í fleiri ár, men sambært yvirlitistrolingum, so er ongantíð so lítið av fiski á Bankanum, sum júst nú. Tað kann so ikki vera ovurveiða, sum týnir stovnarnar har. Mangir royndir fiskimenn eru sannførdir um, at minkandi veiðan kemst ikki av trároynd.

Manglandi føði og vánaligar umstøður hjá ynglinum, er orsøkin siga fleiri. Ein hugsan er, at nógvi makrelurin, sum kemur inná grunnin tíðliga á sumri, etur meginpartin av nýklæktu fiskalarvunum. Makrelurin verður eisini lagdur undir at gera enda á reyðætinum,

sum er føðigrundarlagið hjá fleiri fiskastovnum.

Hesi heilt serligu viðurskifti mugu havast í huga, tá tiltøk skulu gerast fyri at endurreisa stovnarnar. Vandi kann verða fyri, at avmarkingar og reguleringar verða gjørdar út frá skeivum grundarlagi. Gongdin er heilt týðulig. Botnfiskaflotin hevur alsamt lækkandi veiðivirðið, meðan uppisjóvarflotin hevur framgongd.

## MAKRELURIN

Nógv orðaskifti hevur verið um býtið av makrelkvotuni. FSN hevur limir í øllum skipabólkum, so vit vilja helst ikki taka støðu til býtið. Tó sakna vit sakligar og objektivar grundgevingar fyri tí býtið, sum hevur verið gjørt higartil. Okkara støða er, at tað mugu bert verða føroysk skip við føroyskum lønarlagi, sum skulu sleppa uppí part.

Mangir ymiskir mátar eru higartil brúktir til at skipa hesa veiðu og einki bendir á, at endaliga loysnin enn er funnin. Longu nú er eitt nýtt avgjald lagt á makrelveiðina fyri komandi ár. Heildarkvotan varð ikki uppfiskað í ár. Hetta kemst serliga av trupulleikum við hjáveiðu av sild. Hjá skipunum hevur tað verið sera torført at verja fyri hjáveiðu. Skiparar eru als ikki tryggir við einari skipan, har teir kunnu blíva lógbrótarar av tilvild.

Tað er umráðandi, at vit til næstu sesong fáa okkurt slag av eini hjáveiðukvotu av sild. Landið kundi tikið ein part av søluvirðinum av hjáveiðuni. Síðani kundi uppsjóvarskipini fingið endurgjald fyri tann miss, teir hava orsakað av minni sildakvotu.

## TILFEINGISGJØLD

FSN er harðliga í móti, at gjøld verða áløgd fiskivinnuni. Vit óttast fyri, at hugburðurin hjá skipaeigarum kann skjótt gerast, at nú vit hava goldið tilfeingisgjaldið, so hava vit gjørt okkara skyldu mótvegis samfelagnum. Fyri at fáa vinning av rakstrinum, kunnu teir kenna seg noyddar at virka veiðuna umborð við lágløntari útlendskari manning.

Fiskurin er okkara einasta náttúrutilfeingi av týdningi. Tí má allur fiskivinnupolitikkur verða grundaður á, at fiskivinnan má skapa umsetning og ringvirkningar í øllum samfelagnum. Um støðið verður tikið í atlitum, fær land og fólk tað besta, sum kann uppnáast, nevniliga økt virksemi og virðisøking. Tá er als ikki neyðugt við nøkrum tilfeingisgjaldið.

## ENDURSKOÐAN AV LÓGINI UM VINNULIGAN FISKISKAP

Sum longu nevnt, so má lógin fyrst og fremst tryggja, at borgarar og vinna her á landi kunnu gagnnýta fiskatilfeingið á forsvarligan hátt. Higartil hevur lógin roynt at vart fiskastovnarnar við at forða fiskimanninum. Hetta er gjørt við at avmarka dagatalið, við tekniskum avmarkingum í reiðskapi, víðfevndum friðingum um allan landgrunnin. Allur okkara heimafloti er niðurpíndur av øllum handa avmarking. Onki er at undrast yvir, at skip hava givið hall í mong ár. FSN hevur ongan áhuga í at varðveita ein alt ov stóran flota. Umráðandi er, at flotin er nóg stórur til at fáa sum mest burturúr tey góðu fiskiárini. Samstundis má hann eisini kunna yvir-



*Nevndarborðið*



*Regin Nónstein greiður frá roknskapinum*

liva, tá veiðan av náttúrugivnum umstøðum svíkur.

## REIÐARAFELAGIÐ

Nú eru nærum gingin 2 ár, síðani Reiðarafelagið gjørdist óvirkið, orsakað av innanhýsis ósemju. Manningarfeløgini hava í hesum tíðarskeiði longt sáttmálan við einstøku skipabólkarnar, uttan nakrar broytingar. Henda støða er ikki haldbar í longdini. Sáttmálin hevur tveir partar. Fyrri partur eru felagsreglur fyri allar skipabólkar og seinni partur ásetur prosentvísa býtið fyri skipabólkarnar og sersáttmálarnar. Fyrr ella seinni mugu vit gera broytingar í felagsreglunum og tá kann úrslitið væl verða, at ymiskar treytir koma at galda fyri skipabólkarnar.

Vit hava fyrr roynt, at fáa nýmótansgjørt setanar- og lønarviðurskiftini í fiskiflotanum. Tá hevur hetta ikki ført nakran veg, tí veikasti parturin av flotanum megnar ikki at átaka sær nýggjar skyldur. Eisini hevur verið tosað um, hvørt setanartreytirnar skulu vera ymiskar í størri reiðaríum, enn teimum sum bert hava eitt skip.

Núverandi skipanir við garantihýru og føstum mánaðarligum útgjaldi, eiga at koma við í sáttmálan. Onkuntíð hevur verði ógreitt, hvat er galdandi tá skip liggja leingi, ella verða seld av landinum. Eisini kann tað geva trupulleikar, um menn siga upp og rýma, meðan uppgerðin er negativ.

## OLJAN

Í 2011 kom inn í sáttmálan fyri ísfiskatrolarar, at oljuútreiðslur omanfyri 3,85 pr/l skuldi vera loyvd felagsútreiðsla. Seinastu mánaðirnar er oljan hækkað nógv, samstundis sum upsaveiðan hevur verið vánalig. Hetta ger, at oljufrádrátturin sæst væl á avrokningini og nakað av misnøgd er um hetta. Eisini er sera ymiskt, hvussu nógv reiðaríini gjalda fyri oljuna. Hetta kann komast av, at summi reiðarí klára at gjalda kontant. Neyvan ber til at fáa oljuna burtur úr aftur sáttmálanum, uttan at okkurt má latast aftur fyri. FSN hevur nevnt, at ein meiri gjøgnumskygd skipan kundi verið innførd, har øll trolskip skuldu trekt eina fasta upphædd av fyri hvønn dagin á sjónum. Línuskipini hava í dag ein fastan frádrátt fyri gjald av reiðskapi. Soleiðis kundi verið sloppið undan illgruna og kegli um ov høgan prís og ov nógvar litrar.

## EITT SAMSKIPAÐ ÁTAK

Manningarfeløgini eru samd um at fara undir eitt samskipað átak, fyri at steðga sosialari dumpinig á føroyskum fiskiskipum. Útlendsk arbeiðsmegi kann ikki arbeiða í Føroyum, uttan arbeiðs- og uppihaldsloyvi, men hetta er eftir øllum at døma ikki galdandi fyri okkara fiskiflota. Vit hava havt nógv samskifti við ymiskar myndugleikar um



*Her sita menn við atkvøðuseðlunum*

hetta vandamál, men allir sum ein renna undan og krógva seg aftan fyri ymiskar gummiparagraffir. Feløgini fara at steðga hesum ódámliga óskili, um neyðugt er við fakligum tiltøkum og valdi. Enn eru tað bert nøkur einstøk skip og reiðarí, talan eru um og vit mugu handla nú, áðrenn hetta vindur enn meira uppá seg

## FARMASKIP

Sáttmálin fyri Farma- og frálandaskip er uppsagdur til at fara úr gildi 1. mars 2013. Tað er einki dulsmál, at lønarlagið her í Føroyum er munandi lægri, enn í Noregi og Danmark. Føroyskir reiðarar er í kapping við útlendsk reiðarí um manning við teimum røttu førleikunum. Tað munnu vera fáir yvirmenn, sum bert fáa sáttmálalønina. Um eitt munandi ískoyti ikki verður givið, so rýma menninir hagar, hýran er betri. Okkara sáttmáli er sostatt eitt slag av minstuløn, sum nýbyrjarar mugu smyrja seg við. Ein mentan er við at taka seg upp, har tann, sum er frekast og ósmædnast, fær bestu lønina. Tann spakføri og eyðmjúki fær bara minni, um hann ikki ger vart við seg.

Fleiri limir hava spurt, um tað yvirhøvur er neyðugt at hava eitt fakfelag, tá ein sjálvur má forhandla seg fram til eina hóskandi hýru. Tíverri hava onkrir limir, sum annars hava verið góðir stuðlar hjá felagnum, meldað seg úr FSN. Hesir menn sigla framvegis við skipum, sum eru fevnd av okkara sáttmálaøki. Eisini eru tað ungir menn, sum koma inn í føroysk reiðarí og tilvita frávelja limaskap í fakfelag.

Støðan er ikki haldbar og kann gerast ein hóttan móti tilverugrundarlagnum hjá FSN. Føroyski arbeiðsmarknaðurin hevur nú í fleiri ár havt nógv lægri hækkingar, enn í Noregi, so at munurin gerst størri og størri, sum tíðin gongur. Reiðarafelagið Fyri Farmaskip og Vinnuhúsið, hava hildið rimmarfast uppá ásetta lønarkarmin. FSN hevur saman við hinum feløgunum fingið onkrar ábøtur í sáttmálan útyvir karmin, men hetta munar ov lítið, tá sjálv grundlønin bert hækkar við 1-2 % um árið. Fyri sjómannin ger tað ongan mun, um hann er við einum føroyskum ella útlendskum skipi. Arbeiðið er tað sama, og hann er heimanífrá í báðum førum. Tað, sum ger støðuna uppaftur verri, er, at skattalóggávan í ávísan mun, favoriserar teir, sum eru undir fremmandum flaggi. Hetta kann neyvan kallast góður sjóvinnupolitikkur.

## FRAMGONGD Í SUPPLY

Skansi Offshore, hevur nú fýra skip, sum eru fult mannað við føroyingum. Hetta fegnast vit stórliga um. Bæði P/F Thor og P/F Krúnborg hava ítøkjuligar ætlanir um nýbygningar. Vit vænta, at okkara sjófólk eisini sleppa umborð hjá teimum.

## TORFØRT AT KOMA INN Í FRÁLANDAVINNUNA

Nógvir føroyskir navigatørar hugsa sær at koma inn í frálandavinnuna. Hetta er sera torført hjá teimum, sum mangla siglingstíð við farmaskipi og hjá teimum, sum ikki hava øll tey serligu førleikagevandi skeiðini, sum krevjast í oljuvinnuni. Summir velja sjálvir at gjalda fyri øll hesi skeið, áðrenn teir bjóða seg fram og kostnaðurin kann lættliga fara uppum kr.100.000.

Vit hava nú gjørt eina royndarskipan í sáttmálanum, har yvirmenn, sum mangla siglingstíð til fyrsta vinnubrævið, kunnu setast til eina lægri hýru, inntil teir hava fingið vinnubræv. Fyrstu 2 árini, ein er í starvi, hevur ein yvirmaður skyldu at brúka upp til 7 frídagar



*Nú skuldi atkvøðast*

til skeið. Um ein yvirmaður sjálvur sigur upp, ella verður burturvístur innan hann hevur verið 2 ár í starvi, so skal hann afturrinda upptil kr. 25.000 fyri skeiðútreiðslur. Hesar skipanir hava til endamáls, at tað skal loysa seg hjá føroyskum reiðaríum, at upplæra og førleikamenna ungar yvirmenn. FSN fær ymiskar afturmeldingar um, hvussu hetta roynist og vit fara at eftirmeta royndirnar, áðrenn samráðingarnar byrja um nýggjan sáttmála.

## FAS VEKSUR

Hóast FAS er komið á listan yvir hentleikafløgg hjá ITF (FOC- list), so koma framvegis skip inn í FAS. Nú eru knapt 100 skip skrásett, og alsamt fleiri føroyskir sjómenn fáa starv á FAS skipum. Serliga Norsk Sjømands Union og danska fakfelagið CO- Søfart eru misnøgd við, at norsk og donsk skip koma undir FAS og halda á at sigla strandasigling í Noregi og Danmark, við bíligari arbeiðsmegi umborð.

## EIN NÝGGJUR MIÐIL

FSN og MF hava í eina tíð umhugsað og kannað, um Mið og Magn kann gerast ein portalur fyri fiski-, farma- og frálandavinnu. Serligt fokus skal verða á arbeiðslívið og vinnumøguleikar. Núverandi heimasíður skulu verða partur av hesum portali. Nógvir nýggir møguleikar við applikatiónum (apps) til telefonina eru ein spennandi partur av hesi verkætlan. Mið og Magn fer at koma út sum vanligt, inntil nakað annað kemur ístaðin

## FSN HÚSIÐ

Skrivstovubygningur okkara er í vánaligum standi. Landsbyggifelagið hevur gjørt eina støðulýsing og blámusoppur er staðfestur í fleiri rúmum, tó ikki í heilsuskaðiligari konsentratión. Fleiri lekar eru í ytra múrinum og um vindeygu og hurðar. Mælt verður ikki til smærri ábøtur, uttan at neyvur kunnleiki er um samlaða umvælingartørvin. Eftir øllum at døma, krevst ein nýggj bjálving og klædningur uttan á múrin. Gamla bjálvingin innanfyri má burturbeinast saman við øllum teimum bleytu eldfimu byggiplátunum, sum eru í húsinum. Tað er ikki loyvt at gera munandi umvælingar, uttan at burturbeina tilfar av hesum slagi. Undir øllum umstøðum verður talan um drúgva og kostnaðarmikla umvæling. Bygningurin er bygdur í 1955 og FSN keypti hann í 1998.

Vit leita støðugt eftir øðrum hóskandi skrivstovuhølum, men





útboðið er sera avmarkað. Ein søla av gamla bygninginum, fer allarhelst at geva stórt hall.

## SAMLAGSTRYGGINGI

Við ársbyrjan yvirtóku FSN og MF umsiting og eftirlit av okkara felags samlagstrygging. Enn hava vit ikki nøkur neyv tøl fyri skaðagongdina, men vit hava staðfest, at færri limir gjalda inn, enn vit høvdu mett. Eftir tilráðing frá Lívstrygging, fara flestu fakfeløg nú yvir til, at innkrevja tryggingargjaldið burtur av inngoldnu eftirlønini. Hetta er ein nógv einfaldari skipan, sum tryggjar, at allir limir sum fáa eftirløn, eru tryggjaðir. Nú er bert eftir at tryggja sær, at allir, sum hava sína eftirløn hjá øðrum eftirlønarfelag, fáa boð um at gera egna flyting fyri tryggingargjaldið. Skriv er sent til reiðarar og limirnar um broytingarnar.

## FAKFELØGINI KEYPA LÍVSTRYGGING

Í vár slepti Bank Nordik sínum ætlanum um at keypa 50% av LÌV frá landinum. Nøkur fakfeløg, sum høvdu eftirlønarsáttmála við LÍV, hildu at tað varð nokk frægast, at feløgini sjálv áttu hetta felag. Tá Landsstýrið fyri nøkrum árum síðan tók avgerð um at selja LÍV, bleiv ein avtala gjørd við fakfeløgini, um at 50% av LÍV skuldu tryggingartakarnir eiga. Ognarfelagið bleiv stovnað og fekk tilsøgn um, at fáa helvtina av partabrøvunum, tá LÍV bleiv selt.

Nú fakfeløgini og Ognarfelagið eiga hvør sína helvt, skuldi borið til at fingið eitt skilagott samstarv, um hvussu LÍV skal rekast í framtíðini. Flestu tryggingartakarar eru limir í fakfeløgunum, tí er tað sera umráðandi at limir í FSN brúka sín valrætt, tá val verður til umboðsráðið í Ognarfelagnum. FSN fer at kunna meir um hetta seinni.

FSN setir umleið kr 50.000 í partapeningi í eitt felag, sum fakfeløgini stovna. Eisini veita vit eitt ábyrgdaralán á kr 500.000. Rentan verður 7% og væntandi verður lánið afturgoldið um 5 til 7 ár.

Nú flestu eftirlønartryggingar eru farnar frá garantirentu yvir til marknaðarrentu, eru avsetingarkrøvini frá Tryggingareftirlitinum munandi linkað. Góð útlit eru nú fyri rakstraravlopi hjá Lívstrygging.

Sjálvt um FSN nú er ein av eigarunum í LÍV, so skal tað framhaldandi standa limunum frítt at velja pensjónsfelag.

## FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ

Drúgva ósemjan við Fíggjarmálaráðið um tænastumenninar hjá Fiskiveiðieftirlitinum, er umsíðir endað við semju. Ósemja varð millum partarnar, um vit áttu eina lønarhækkan, sum onnur fingu í 2003. Málið var loyst við, at limir okkara



*Ellintur Abrahamsen, nevndarlimur, stóð ikki fyri vali í 2012*



*Gulak Gulaksen nývaldur í nevndina*



# NAVIGATØRAR Á AÐALFUNDI

fingu eina umflokking, sum er verd umleið 6%. Onkrar aðrar ábøtur eru eisini komnar í avtaluna, men enn væntar at fáa í rættlag lønarviðurskiftini, tá ein skipari loysir av í síni frítíð. Málið hevur verið eitt hitt drúgvasta í søguni hjá FSN. Tað hevði eisini týdning at fáa endað málið, so annað samskifti við Fíggjarmálaráðið kundi normaliserast.

FSN helt leingi fast við, at teir sum eru farnir úr starvi í hesum tíðarskeiði, eisini skuldu fáa kompensatión fyri manglandi lønarhækkingina. Hetta vísti seg at verða ómøguligt at fáa ígjøgnum. Tilboðið, vit fingu um umflokking, var ov gott at siga nei til. Alternativið var at draga mótpartin í eitt kostnaðarmikið rættarmál, við ivingarsomum útlitum. Nevndin hevur síðani umhugsað at kompensera teir, sum eru farnir á annan hátt. Teir, sum framvegis eru í tænastu, fáa bæði lønarhækking nú og hægri tænastumannapensjón við eftirlønaraldur.

## STRANDFERÐSLAN

Sáttmálin fyri Strandferðsluna var í juni framlongdur til 1. okt. FSN heldur framvegis fast við, at árliga arbeiðstímatalið skal lækka úr 2548 niður á 2400. Svarið vit fáa, er, at so skal lønin lækka samsvarandi. Vit góðtaka ikki, at altjóða krøv um avmarking í arbeiðstíð hjá sjómonnum, skal koyra okkum niður í løn.

Nú verða nýggju hvíldarreglurnar settar í verk. Sjómenn skulu hava 77 tíma hvíld um vikuna. Torført er hjá SSL, at fáa arbeiðstíð og hvílitíð at vera innanfyri teir 168 tímarnar, sum nú einaferð eru í eini viku. Uppskot hevur verið frammi um, at limir okkara skulu nakrar tímar umborð í síni fríviku, fyri at uppfylla arbeiðstímanormin. FSN hevur avvíst hesum uppskoti staðiliga. Enn er ikki heilt greitt, hvussu hetta verður loyst, men støðan er spent millum partarnar.

## HAVNAMEISTARAR

Sáttmálin fyri havnameistarar og havnaumsjónarmenn er longdur fram til 1. okt 2013, við somu lønarhækking, sum er galdandi á almenna arbeiðsmarknaðinum. Partarnir eru samdir um, at taka upp samráðingar um samsýning til havnameistarar, sum gera loðstænastu fyri kommunurnar.

## FASTI GERÐARRÆTTUR

FSN hevur nú undirskrivað sáttmálan um Fasta Gerðarrættin. Hetta merkir, at sáttmálatulkingar og ávís sáttmálabrot skulu leggjast fyri hendan stovnin. Tað er nógv bíligari og skjótari at brúka hendan rættin, enn at stovna ein serstakan gerðarrætt í hvørjum einstøkum máli. Fiskimannafelagið er nú eisini komið uppí Fasta Gerðarrættin og bert eitt fakfelag er uttanfyri nú.

## NAVIGATØRFAKIÐ BROYTIST

Tað er ikki longur nøkur stór uppgáva at finna unt á heimshøvunum.

Teknisk hjálpitól hava broytt fakið kollveltandi. Teldu tøknini kunnu næstan sjálvi sigla skipið trygt í nógvari ferðslu og trongum farvatni. Uppgávan er nú at vera tøkur, tá tøknin av onkrari orsøk ikki virkar. Hetta merkir ikki, at navigatørar hava minni at gera enn fyrr. Alt gongur nógv skjótari fyri seg nú á døgum. Vanligt er, at skip koma í fleiri havnir sama dag.

Tekniska útgerðin umborð, krevur nógva servitan, sum skal uppdaterast javnt og samt. Fyrisitingarligu uppgávurnar eru vaksnar til tað nærum ómøguliga. Kanningar hava víst, at 80% av arbeiðinum hjá skiparanum á farmaskipum er ber fyrisiting. Stýrimenn brúka sína tíð til at útfylla checklistar og váttanir av øllum handa slagi. Góður sjómansskapur er í dag góð fyrisiting og áhaldandi førleikamenning.

Innan fiskiskap, er arbeiðið hjá skipara og stýrimonnum eisini kollvelt. Tekniska útgerðin á brúgv, dekki og maskinu, kennir nærum ongin mørk. Størsta avmarkingin er í kvotum og veiðirættindum. Stór krøv verða sett til, at veitt verður lógliga og skynsamt. Skiparin skal prógva, at hann heldur fiskarí-, manningar- og umhvørvislóggávu. Fyrisitingarligu uppgávurnar økjast skjótt umborð á fiskiskipum.

Navigatørstarvið er fyri tað mesta, nú at handfara framkomin tól, og at tryggja og prógva, at alt fer lógliga fram.

Maskinfakið er eisini broytt. Meistarin umvælir og viðlíkaheldur ikki longur. Nú er uppgávan, at fylgja við, hvussu alt riggar og síðani rapportera til teknisku deildina hjá reiðarínum. Serfrøðingar koma síðani umborð at gera viðlíkahald og umvælingar.

Starvið sum dekkari ella matrósur, er eisini við at hvørva. Nógv nýggj starvsheiti eru komin umborð á skipini. Hetta er serliga galdandi í frálandavinnuni, men man eisini fara at koma aðrastaðni. Umborð á framkomnum fiskiskipum er nógv ymisk starvsheiti, sum ikki vóru til fyri fáum árum síðani.

Øll hesi viðurskifti broyta okkara uppfatan, av hvat tað er at vera sjómaður. Rangordan og ábyrgdarbýti verða í hesum døgum definerað av nýggjum. Uppbýtið millum brúgv, dekk og maskinrúm, kann gott verða burturi um fá ár. Henda veruleika má FSN og limirnir fyrireika seg uppá.



*Ein løta var til eitt prát - kanska um felags minnir*

## FAKFELAGIÐ Í FRAMTÍÐINI

Gongdin í okkara grannalondum er, at nógvir limir venda fakfelagnum bakið. Alternativ fakfeløg verða stovnað. Hesi feløg hava eina heilt aðra hugsjónarliga bakgrund. Her er talan um løntatakar-felagsskapir, sum ikki eru avmarkaðir av fakmørkum. Henda gongd er ikki so sjónlig í Føroyum enn, men fakfeløg verða samanløgd fyri at standa sterkari. Eg havi longu nevnt, at ungdómar ikki kenna tað, sum um teimum tørvar nakað fakfelag. Hetta er bert ein óneyðug útreiðsla, siga summi.

FSN kann upplýsa, at vit á hvørjum árið innheinta meira pening til limirnar, enn samlaða limagjaldið. Tað samlaða roknistykkið sigur, at tað loysir seg fyri tann samlaða limaskaran. Tann, sum er so heppin, at hann ongantíð hevur havt brúk fyri felagnum, kann saktans siga, at hetta er ein útreiðsla. Fakfelagið hevur eisini eina fyribyrgjandi ávirkan á arbeiðsgevarar. Teir vita av royndum, at tað gongur ikki at leggjast á tað, sum arbeiðstakarin av røttum eigur.

## VAL AV NEVNDARLIMUM

Á skránni var m.a. val av nevnd, sum telur 11 limir. Nevndarlimir verða valdir fyri tvey ár, so allir nevndarlimirnir stóðu ikki fyri vali á hesum aðalfundinum.

Úrslitið av atkvøðugreiðsluni var, at hesir vóru afturvaldir í nevnd felagsins:
Dan Ingi Andreasen úr Havn, Leivur Christiansen úr Miðvági, Leif Joensen úr Klaksvík, Annfinn Garðalíð av Skála, og Eyðstein Djurhuus úr Havn.

Nývaldur í nevndini var Gulak Gulaksen úr Klaksvík, hann hevur ikki haft sæti í nevnd felagsins áður.

Nevndin skipaði seg eftir fundin: Eyðstein Djurhuus var afturvaldur formaður og Regin Nónstein, afturvaldur næstformaður.

Hesir stóðu ikki fyri vali á aðalfundinum í 2012: Ellintur M. Abrahamsen úr Fuglafirði, Jákup Gøthe av Toftum, Ólavur Biskopstø úr Klaksvík og Andrias V. Højgaard úr Hoyvík.
Gev gætur: Øll formansfrágreiðingin er á heimasíðu felagsins www.fsn.fo



# Hátíðarhald og próvhandan

## 25. januar 2013 vóru fleiri virðislønir og 45 prógv handað í Vinnuháskúlanum:



### SKIPSFØRARAR:

Harry E. Thomsen, Eyðun Højbro, Berint Kalsø, Poul Hans Justinussen, Rólvur í Nórðnástovu, Regin Mørkøre, Árni Stenberg, Jón M. Gærdbo, Jóannes N. Didriksen, Eliesar Jacobsen, Dan Thomsen, Jógvan F. Tróndheim, Trygvi B. Hermansen, Páll Atli Jacobsen og Hans Asbjørn Eysturdal.

### Virðislønir, sum vóru latnar skipsførarum:

Harry E. Thomsen, gull ur frá A. P. Møller, og Berint Kalsø, klokkusett frá Tryggingarfelagnum Føroyar

### Virðisløn fyri at vera primus motor:

Eliesar Jacobsen: Ur, kvívur og pennasett frá Søfartens Ledere. Virðislønin fyri hægsta miðal próvtal var hesaferð ein sekstantur, sum Føroya Skipara- og Navigatørfelagnum handaði Harry E. Thomsen.

# Lívið tengt at sjónum



*Vilhjálmur Gragoriussen, skúlastjóri á Vinnuháskúlanum*

Í røðu síni fyri teimum mongu, sum vóru komin saman at hátíðar halda dagin saman við teimum, sum fingu handað prógv á Vinnuháskúlanum 25. januar 2013 segði skúlastjórin Vilhjálmur Gregoriussen, m.a.

Mínar persónligu visjónir fyri Vinnuháskúlan eru, at skúlin gerst ein vitanardepil fyri tey, ið hava sítt yrki tengt at sjóvinnuni og eisini at vinnuligum virksemi á landi. Atgongdin hjá okkara sjófólki út í heim hevur sum regul verið umvegis ein maskinmeistara- ella navigatiónsskúla.

Hann hevur fostrað nógv fólk, sum búleikast her á klettunum, og fólk sum fara út í heim og venda aftur við bæði verðsligum og andaligum ríkidømi. Altjóðagering hevur altíð verið tilvitað og hevur altíð trívst væl innan skúlans gátt. Tí er tað eisini mítt ynski, at tit, sum nú fara út í vinnulívið, støðugt fara at venda aftur til skúlan fyri at fáa nýggja vitan og eisini fara at venda aftur til skúlan við nýggjari vitan. Hesin tvívegis flutningur av vitan er alt avgerandi fyri ein góðan vitanardepil.

## EITT ORÐAFELLI SIGUR NAKAÐ SOLEIÐIS:

- Skal tú gera eina íløgu eitt ár fram í tíðina, so skal tú velta epli. Tí eftir einum ári, ella so fært tú úrskurðin.
- Skalt tú gera eina íløgu 10 ár fram í tíðina, so skalt tú seta niður eitt træ. Tí eftir 10 árum kanst tú njóta fruktir træsins.
- Skal tú gera ein íløgu 100 ár fram í tíðina, so skal tú gera íløgur í útbúgvingar.

Hesi orð lýsa týdningin av at gera íløgur í útbúgvingar. Úrskurðurin sæst ikki beinanvegin, men eftir nøkrum árum og til tíðir eftir nógvum árum. Tí er eisini umráðandi, at lesandi, lærarar og ráðandi í samfelagnum eru tilvitað um, hvussu góður gróðrarbotnurin verður, tá íløgur verða gjørdar í útbúgvingar.

## BACHELOR- MASTERSTØÐIÐ

Skal kappingarførið á altjóða arbeiðsmarknaðinum betrast, so er eingin ivi um, at næsta stigið eigur at verða eitt bachelor- ella master støði fyri útbúgvingarnar. Harvið er ikki sagt, at rúm ikki skal verða fyri verandi útbúgvingum. Sum samfelagsmynstrið er í dag, verður tørvur á báðum í rúma tíð framyvir.

Eg ímyndi mær eina stigvísa uppstigan av útbúgvingunum til bachelor- og masterútbúgvingar.

Tit sum í dag fáa prógv, skulu sjálvsagt eisini fáa henda møguleika, um hugur verður til tess. Granskingarætlanir um lívið tengt at sjónum eru sera viðkomandi fyri framhaldandi samfelagsmenning.

Tá tit nú koma út í vinnulívið, fara tit eisini at ásanna, at har er eitt hav av granskingarmøguleikum um lívið tengt at sjónum.

### VINNUHÁSKÚLIN Á EINUM VEGAMÓTI

Vinnuháskúlin er í dag eisini á einum vegamóti. Nýggj altjóða krøv um maritimar útbúgvingar **skulu í seinasta lagi verða innførd í summar**.

Hetta merkir, at útbúgvingarnar tá skulu lúka tey so nevndu STCW-Manila krøvini. Skúlin hevur miðvíst tillagað útbúgvingarnar til nýggju krøvini, og nú skal so síðsta hondin leggjast á verkið.

Men tað verður eisini neyðugt at hava eitt vakið eyga við hvønn tørv tann økta skipaferðslan í føroyskum sjóøki fer at eftirspyrja, nú tað eftir øllum at døma verður siglandi í arktiskum øki umvegis norður eystur og norður vestur leiðina.

---

# Mouritz Mohr: Gestarøðari



*Mouritz Mohr, Stjóri í Mest*

Felags fyri allar teir, sum eru farnir úr Føroyum út í heim við sama prógvi, sum tit í dag hava fingið handað er, at teir hava verið so góð umboð fyri Føroyar, at vit eru ein tjóð har eftirspurningurin eftir okkara førleikum eru nógv eftirspurdur.

Mouritz Mohr segði eisini í røðu síni, at tað sigst at gamli A. P. Møller einaferð skal hava sagt nakað soleiðis: Sjómenn skal man ein fáa sær frá Svenborg, Marstal, Fanø ella úr Føroyum, tí teir høvdu góðar konur, vóru álitismenn og góðir sjómenn.

### HEILSA, TRYGD OG UMHVØRVIÐ

Hugsi her um viðurskiftir sum heilsa, trygd og umhvørvið (HTU), arbeiðsloyvir- og mannagongdir, skrivligar frágreiðingar um alt sum tit gera, sertifiseringar av tykkum sjálvum og tí útgerð sum verður nýtt, og so tey alskins skeiðini tit skulu á.

Ein onnur avbjóðing er at samskifta á fremmandamálið og samstarva við fólk úr ymsum londum, sum hava aðra mentan og annan uppruna.

Taki hetta sum eina avbjóðing og eina menning, hetta er partur av altjóðagerðini í dag.

Tit koma óivað allir upp eftir stiganum, og gerast yvirmenn ella leiðarar, og minnist tí til at vísa virðing fyri teimum tit starvast saman við, ella hava ábyrgdina av, og virði eisini ymiskleika millum starvsfelagar tykkara.

### HVØR HEVUR STØRST TÝDNING UMBORÐ

Mouritz Mohr endaði røðu sínar soleiðis: Tað er eingin loyna at tað altíð hevur verið eitt slag av speisemi ímillum skiparar og maskinmenn um, hvør nú er tann týdningarmiklasti umborð? Er tað tann á brúnni ella tann í maskinrúminum?

Tað er tó ein sannroynd, at tað er neyðugt við báðum, og at neyðugt er við góðum samstarvi tykkara millum.

Men – sum útbúgvin maskinmeistari – má eg skoyta uppí, at eg haldi, at skipið siglir í øllum førum ikki uttan maskinmeistarin er umborð.

Eg havi ikki tað longu siglingarsøguna, men eg havi tó roynt bæði heima- og útisigling, og fari eg staðiliga at heita á tykkum, farið út í verðina – fái tykkum royndir har, verið nærlagdir og gerið mun.

Samfelagið hevur brúk fyri tykkum, og tykkara umdømi, – eg ynski tykkum tillukku við próvnum tit í dag hava fingið.





## SKIPARAR:

Martin M. Schmidt, Búgvi Thomsen, Kjartan Jacobsen, Anskar í Kárastovu, Finn Christensen, Martin K. Kragesten, Eron H. Winther, Bjartur Thomsen, Karstin Vang, Pauli Poulsen, Gunnar Olsen, Asbjørn Selfoss, Brian Hansen, Robert S. Wardum, Hans Jacob Joensen, Ólavur Jacobsen, Rógvi Sveinsson, Petur Johansen, Bjarki Hansen, Pól Flosi Johansen, Bjarti N. Petersen, Jákup Pauli Jónsson og Óla Chr. Debes.

**Virðislønir lætnar skiparum:**
Martin M. Schmidt, kikara frá P/F Thor, Kjartan Jacobsen, barometur og klokkusett frá Faroe Agency, og Finn Christensen, barometur og klokka frá Faroe Ship





## MASKINMEISTARAR:

Mannbjørn Simonsen, Petur Martin Jacobsen, Djóni Ludvig Dávur Johansen, Ingi Eliasen, Líggjas Hansen og Jan Poulsen.

**Virðislønir vóru lætnar maskinmeistarum:**
Mannbjørn Simonsen, fototól frá Bank Nordik, og Djóni Ludvig, mátitól frá Maskinmeistarafelagnum.

**Virðisløn fyri ídni:**
Mannbjørn Simonsen, gull ur frá
A. P. Møller

# Stórur upsastovnur tryggjar ikki tilgongdina

Fyri føroyska upsan hava vit sæð størstu tilgongdina, tá upsastovnurin hevur verið lutfalsliga lítil. Tí er ein stórur upsastovnur eingin trygd fyri góðari tilgongd. Hinvegin eru greið tekin um vánaligari vøkstur hjá einstaka upsanum, tá upsastovnurin er stórur. Tað sigur Eydna í Homrum, havlívfrøðingur, sum hevur granskað upsastovnin undir Føroyum.

Mangan verður sagt, at tá krubban er tóm, bítast hestarnir. Men tað øvugta kann helst eisini gera seg galdandi – at tá ov trongligt er um borðið, verður lítið í part.

Í øllum føri staðfesta kanningar hjá Havstovuni, at upsin veksur seinni, tá stovnurin er stórur. Eydna í Homrum, havlívfrøðingur, hevur skrivað eina ph.d. ritgerð um føroyska upsastovnin, har hon lýsir at kalla øll høvuðsfyribrygdi hjá hesum fiski, ið seinastu hálvu øldina hevur havt so stóran týdning fyri føroyska fiskimannin og harvið alt samfelagið.

– Jú, tað er vísundaliga prógvað, at tá nógv er til av upsa, veksur hann seinni, meðan hann veksur skjótari, tá stovnurin ikki er so stórur, sigur Eydna í Homrum og peikar á kanningarúrslit frá ph.d ritgerðini, ið staðfesta, at so er.

Serliga er tað við 3-4 ára gamla og 4-5 ára gamla upsanum, at munur sæst á vøkstrinum frá ári til árs. Myndin er ikki at fara skeiv av, tá vøksturin hjá hesum aldursbólkum verður samanborin við, hvussu stórur stovnurin annars er, sama tíðarskeið, sigur Eydna í Homrum.

– Vit kenna ikki orsøkina, skilt á tann hátt, at hesi viðurskifti eru ikki granskað neyvari, eitt nú við støði í magakanningum og líknandi kanningum, sum Havstovan regluliga ger. Men tað er tó rættuliga upplagt, at ungi upsin onkursvegna fær minni føði, og tí veksur hann seinni, tá stovnurin er stórur sigur Eydna í Homrum.

Harumframt er ein stórur stovnur ikki nøkur vissa fyri, at tilgongdin eisini verður góð. Kortini er granskarin ikki heilt við uppá tað, tá vit út frá hesum spyrja, um tað so ikki er mest rationelt at fiska rímuliga nógv, soleiðis at stovnurin ikki gerst ov stórur.

– Nei, so langt vil eg ikki fara, sigur Eydna í Homrum og vísir á, at nógv onnur viðurskifti eisini gera seg galdandi.

## FRÁFLYTING

Tosar tú um upsa í Norðuratlantshavi, so er talan um fleiri ymiskar



*Eydna í Homrum er fødd í 1974. Hon tók grundútbúgvingina í lív- og evnafrøði á Fróðskaparsetrinum í 1995, og í 2007 tók hon masterprógv í havlívfrøði í Svøríki. Í fjørsummar vardi hon ph.d. ritgerð um føroyska upsan. Hon starvast í dag á Havstovuni.*

stovnar. Vit hava tann føroyska stovnin, ið heldur til her á okkara leiðum, vit hava ein íslendskan upsastovn og ein norskan stovn. Eisini er ein fjórði stovnur, ið heldur til í Norðsjónum og vestanfyri Skotland. Og harumframt heldur upsi eisini til í Kanada.

Men meðan at kalla eingin upsi fer úr íslendskum sjógvi, og bara umleið seks prosent av norska upsanum verður fingin aftur við Føroyar ella Ísland, so er øðrvísi við føroyska upsanum. Kanningar hjá Havstovuni staðfesta, at okkurt um triði hvør upsi, sum er størri enn 60 sentimetrar til longdar, fer úr føroyskum sjóøki. Bróðurparturin, umleið fjórði hvør upsi størri enn 60 sentimetrar, fer í íslendskan sjógv. Hetta staðfesta kanningar hjá Havstovuni av ferðingarmynstrinum hjá føroyska upsanum, gjørdar saman við granskarum úr Íslandi og Norra.

– Kanningarnar vísa tó ikki, um upsin verður verandi uttanfyri, ella hann eisini kemur aftur. Tað er ikki vísindaliga staðfest, sigur Eydna í Homrum og vísir á, at metingarnar byggja á merkingar av upsa í seksti-, sjeyti- og nítiárunum.

Men tá okkurt um triði hvør, vælvaksni upsi svimur úr føroyskum sjógvi, er tá ikki rættast at fiska sum mest, áðrenn hann rýmir? Aftur hesaferð mutar granskarin ímóti:

– Nei, vit vita jú ikki, um upsin kemur aftur í føroyskt øki seinni. Vit hava onkrar ábendingar um, at føroyski upsin leitar sær burtur um summarið – helst at leita sær føði– og síðani kemur aftur at gýta um veturin.

Ein niðurstøða frá ferðingarkanningunum var, at stórur upsi tykist ferðast vestureftir. Úr norskum og føroyskum øki til Íslands. Frásagnir siga eisini, at tú í Grønlandi bara fært stóran upsa. Men hetta er ikki vísindaliga staðfest.

## GRÓÐURIN ÁVIRKAR

Síðani sekstiárini er rættuliga ymiskt, hvussu upsastovnurin hevur verið fyri. Tilgongdin til stovnin hevur verið ymisk, og fiskiskapurin hevur verið misjavnur. Við at samanbera hesi tøl við aðrar kanningar sæst, at greitt samband er millum gróðurin á landgrunninum og tilgongdina til upsastovnin. Hetta samband sæst tó best umvegis fiskasløgini hvítingsbróður og nebbasild, sum eru týðandi partur av føðini hjá unga, føroyska upsanum.

– Jú, myndin er týðilig, sigur Eydna í Homrum og vísir á, at Havstovan í fleiri áratíggju hevur gjørt kanningar av hesum viðurskiftum, og úrslitini prógva samanhangin.

– Er nógv til av hvítingsbróðurs- og nebbasildayngli um summarið, síggja vit aloftast góða tilgongd til upsastovnin eini tvey ár seinni. Fyri vaksna upsan, sum livir longri útiá, eru hvítingsbróðir og ungur svartkjaftur stórur partur av føðini, sigur Eydna í Homrum.

## UPSIN ARGAR LÍNUNA

Í heyst og tíðliga í vetur fingu línuskipini væl av upsa. Sambært tíðindunum frá línumonnum vóru tað serliga línuskipini, ið royndu eftir longu og brosmu á djúpum vatni eystanfyri, ið fingu nógvan upsa á línuna. Tað er rættuliga óvanligt, at upsi í stórum nøgdum fæst við línu, og fleiri fiskimenn søgdu seg undrast.

Sama undran er eisini á Havstovuni, har tey bitu merki í tíðindini frá línumonnum.

– Nei, tað er ikki vanligt, at upsi etur føði av botni, og hann burdi tískil ikki bitið á línu, sigur Eydna í Homrum.

Á Havstovuni hava tey ikki gjørt kanningar av fyribrigdinum, men fylgja tó við áhuga gongdini.

– Sum Havstovan hevur frætt, so var upsin sera lívligur – tað er tekin um, at upsin hevur etið agnið, tá línan er á veg upp ella niður. At upsi legst á agn í heila tikið hongur helst saman við manglandi, náttúruligari føði. Síðani farið varð undir regluligar magakanningar á Havstovuni í 1997, hava hvítingsbróður og svartkjaftur verið høvuðsføðin hjá upsanum á djúparu økjunum á Landgrunninum, og í løtuni er minni til av báðum hesum sløgum. Kanningar av toski vísa, at tá lítið er til av natúrligari føði, tekur hann betur á línu. Tann toskurin er ofta verri í holdum, enn toskurin, sum verður fingin við troli, og kann tað vera eitt tekin um, at hann broytir mynstur, tá lítið av føði er at fáa, sigur Eydna í Homrum.

Hon leggur tó dent á, at ongar slíkar kanningar eru gjørdar fyri upsa, og tí skal samanberingin við toskin takast við fyrivarni.

– Men tað er so ikki logist lívfrøðiliga, at upsi bítur á línu á botni, staðfestir granskarin, tí so at siga øll føðin, sum er staðfest í upsamagum, er slíkt, sum livir leyst av botni.

# Støðd á upsastovninum

TOTAL BIOMASS




*Upsastovnurin er vaksin og minkaður í trimum umførum, síðani stovnsmetingarnar byrjaðu í 1961. Stovnurin var metstórur um aldarskiftið, men er síðani minkaður rættuliga nógv. Serliga árgangirnir frá 1998 og 1999 vóru stórir, men síðani tá hevur tilgongdin verið miðal. Nevnast skal, at óvissan fyri 2-3 tey seinastu árini í eini stovnsmeting er rættuliga stór.*
*Kelda: ICES-arbeiðsbólkafrágreiðingin NWWG 2012*

Eydna í Homrum vísir harafturat á útsjóndina hjá fiskasløgunum, har toskur og hýsa hava yvirbit og tí eru væl útgjørd at taka føði av botni. Hinvegin hevur upsin undirbit og tekur sína føði uppi í sjónum. Eisini hava toskur og hýsa grunnnøs, hvørs funktión er sum tunga, er eitt „smakkiorgan." Slíka hevur upsin ikki.

## RÍMULIG ÚTLIT

Síðstu árini hevur upsafiskiskapurin verið rættuliga svingandi, hóast fiskifrøðin hevur mett upsastovnin at vera rímiliga væl fyri, øll árini. Meðan umleið 60.000 tons av upsa komu uppá land um árið, tíðarskeiðið frá 2005 til 2009, so er upsafiskiskapurin síðani minkaður støðugt niður á umleið 30.000 tons.

Tað sama ger seg galdandi fyri stovnsmetingarnar. Meðan fiskifrøðingarnir fyri fáum árum síðani mettu upsastovnin at vera væl omanfyri 300.000 tons, so eru metingarnar nú niðri á umleið 150.000 tonsum.

– Eg ímyndi mær, at vit eru í einum lítlum aldudali júst nú. Men tilgongdin til upsastovnin er hampilig, so tað sær ikki so galið út, sigur Eydna í Homrum.

Men ber til at tosa um nakra ideella støðd á upsastovninum, havandi í huga, hvussu upsin veksur og ferðast? Granskarin heldur ikki.

– Nei, heldur eiga vit at góðtaka og laga okkum eftir, at stovnsstøddin sveiggjar, alt eftir hvussu lívfrøðin og umhvørvið annars skikka sær, sigur Eydna í Homrum.

# Landingar




*Landingar av upsa síðani 1993. Sum stabbarnir vísa, hava landingarnar tvey tey seinastu árini verið væl minni enn tey undanfarnu tíggju árini. Kelda: hagstova.fo*

Trolkanningar um summarið við Magnusi Heinasyni vísa, at teir fáa fyrsta upsan, tá hann er um 20 cm til longdar. Sum upsin veksur, fæst hann longri frá landi, og tá hann er um 40 cm til longdar fáast fyrstu upsarnir úti á Føroyabanka. Tá hann er um 60 cm byrjar at tynnast inni við land, men meira er at fáa úti á. Tá hann er longri enn 60 cm eru nøgdirnar størstar á ytstu støðunum, sum Magnus Heinason tekur á yvirlitstrolingunum.

## FAKTA
## ÚR TILMÆLINUM HJÁ HAVSTOVUNI FYRI FISKISKAPIN 2012-2013

Fiskidagatalið hjá bólki 2, ið serliga fiskar upsa, kann verða tað sama sum í 2011/2012. Gýtingarstovnurin er minkaður munandi síðani 2006, men er enn hampiliga væl fyri. Veiðutrýstið er minkað síðani 2009, men er enn oman fyri tilrádda veiðutrýstið. Tilgongdin seinastu árini hevur verið yvir miðal. ICES mælir til at minka veiðutrýstið við 44% í mun til miðal veiðutrýst - ið seinastu 3 árini niður á ikki meira enn tilrádda veiðutrýstið upp á 22%.

# Annfinn Garðalíð:

# Lívið umborð

## Á HAVTASKUVEIÐU

Í 2001 byrjaði eg sum avloysari við garnaskipinum Vesturland, sum tá var heimahoyrandi á Eiði. Í februar 2002 keypti P/F Thor í Hósvík garnaskipið, og eg fekk møguleikan at sigla hjá nýggja reiðarínum, sum fastur stýrimaður. Men síðan apríl 2002, tá eg mynstraði fyrstu ferð sum skipari hjá nýggja eigaranum, havi eg siglt við har. Eg hevði tó farloyvi í eitt gott ár, og byrjaði so aftur sum skipari við Vesturland/ Thor á garnaveiðu.

## HAVTASKUSESONG

Tað var púra vanligt, at vit byrjaðu havtaskusesong í oktobur, og tað var vestur av Føroyabanka á 200 favna dýpi. Tað er soleiðis, at havtaskan kemur frá djúpum vatnið og søkir grynri vatn, 160 favnar og grynri, har hon gýtur síni rognarbond, sum eru fleiri metur long. Vit plagdu at royna har í oktober, november og desember og gjørdu sera góðar túrar, og bjargaðu árslønini uppá hesa tíðina. Plagdu eisini at royna á Mykinestunguni, vestur úr Mykinesi og norðan fyri, og hetta fram til juni, juli. Tá var oftani lagt um til Svartkalva. Men hesi seinastu árini, eru stórar broytingar í ferðamynstrinum hjá havtaskuni. Nú fáa vit so at siga ongan fagnaðartúr vesturi av Føroyabanka um heystið. Tað vísir seg sum alt er forskotið, havtaskan kemur seinni, og hon kemur aðrastaðni enn hon plagdi.

## MANNAGONGDIN UMBORÐ

Mannagongdin umborð er vanliga hendan: Vit eru 10 mans umborð, og byrja draging tíðliga um morgunin, og gevast um kvøldið, og hava eina frívakt uppá 7 tímar.

Vit royna at hava máltíðirnar soleiðis: Morgunmatur áðrenn vit byrja draging, og døgurða til vanliga døgurðatíð, og nátturða soleiðis sum tað passar við draging. Soleiðis koyra vit allan túrin sum vanliga er ein vika. Sunnudag koyra vit vanliga sum hinar dagarnar, men vit taka ein støðg eftir døgurða, har eg lesi lestur ella eitt andaktsstykki, áðrenn og aftaná lestur syngja vit nakrar sangir, og enda so í felag við faðirvár. Hetta meti eg at vera ein góður skikkur, og hann er væl móttikin umborð.



*Heðin Solmunde riggar til at draga*



*Stýrimaðurin Súni Clementsen*



*Jákup Thorsen við stórari havtasku umborð á Vesturland*



*Janus Nolsøe, sum júst hevur tikið boyu*



*Frá vinstru: Sørálvur, Esmar, Rógvi, og Martin*



*Stýrimaðurin Súni Clementsen og Sørálvur Henze gera klárt at seta*

# Nýskipan av fiskiveiðulóggávuni



*Jacob Vestergaard*

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, hevur sett bólk av embætisfólki at arbeiða við at endurskoða lógina um vinnuligan fiskiskap.

Partvís snýr hetta arbeiðið seg um at geva lógini eina tekniska „yvirháling", og partvís skulu nýggjar ásetingar gerast.

Arbeiðið er skipað sum verkætlan í Fiskimálaráðnum við einum verkætlanarbólki og einum stýrisbólki. Harumframt er ein politiskur fylgibólkur settur, sum eisini ávirkar tilgongdina.

Ein partur av hesum arbeiði var at skipað fyri Fiskivinnutingi 16. november 2012.

Fiskivinnutingið setti kikaran á, hvussu vit fáa lønsemi í allan fiskiflotan, hvussu vit fíggja íløgur í vinnuna, hvussu høvuðsvinnan fær góðar og støðugar karmar, um fiskurin er ogn Føroya fólks og hvat er avgerandi fyri, at tey ungu velja sær fiskivinnu sum lívsleið. Tingið var skipað við framløgum, hugleiðingum og kjaki.

## JACOB VESTERGAARD SETTI FISKIVINNUTINGIÐ

Løgtingi skal endurskoða fiskivinnulóggávuna ¡V hon skal regulera og seta karmar um okkara høvuðsvinnu, so vinnan kann mennast frameftir.

Landsstýrismaðurin ætlar at finna breiðar politiskar semjur um lóggávuna eingin far alt við, men allir flokkar skulu kenna seg heima i lógarverkinum.

Settur er ein politiskur fylgibólkur at skifta orð um týdningarmiklar partar av lóggávuni. Sjónarmiðini eru sjálvandi ymisk, men arbeiðið verður tikið í størsta álvara og hevur verið sera konstruktivt higartil.

## HVØRJI ERU SO HØVUÐSEVNINI?:

Endamálið við lógini eigur at vera at skapa vinnuligar karmar. Í dag tekur lógin eisini onnur politisk atlit, t.d. at økismenning.

Hvussu skal loyvisskipanin síggja út? Vit eru samd um, at endaligi ræðisrætturin er fólksins, umboða av Løgtinginum. Ognarrætturin liggur hjá samfelagnum. Men vit skulu hava greiðan ræðisrætt á kvotum og fiskirættindum til tey, sum eru i vinnuni, soleiðis at vinnan fær møguleika at menna seg i langtíðarhøpi.

Tað hevur stóran týdning at avklára spurningin um 2018.

Ein stórur spurningur er, um vit skulu hava eina kvotaskipan i staðin fyri fiskidagaskipan á heimaleiðunum?

Vit eiga at hyggja eftir verandi bólkabýti og hyggja eftir, um vit eiga at seta flotan saman á annan og meira fleksiblan hátt. Vit eiga at gera eina serliga skipan fyri útróðrarflotan, men allir aðrir bólkar skulu hava umsetiligheit.

Hvussu eigur landið at býta út fiskirættindi? Eg ímyndi mær, at verandi aktørar bera tað víðari. Her er politiska spennið tó rættiliga vítt. Tá talan er um útlendskan eigaraskap er spennið eisini ógvuliga vítt, bæði í vinnuni og i politisku skipanini. Eg meini, man eigur at niðurtóna útlendskan eigaraskap.

Eg eri av tí fatan, at gjøld ikki gagna vinnuni, men mín meining kann eisini vera noydd at lúta. Higartil er tosað mest um yvirskotsgrundað gjald á vinnuna.

Hvønn leiklut skulu Løgting og Landsstýri hava? Hvør skal áseta fiskidagarnar?



*Halgir Winther Poulsen*

# Ogn Føroya fólks er millum nakað og einki

**Millum teirra, sum høvdu framløgur á Fiskivinnutinginum var Halgir Winther Poulsen, hann var áhugaverdur og sera kontantur:**

Stóra broytingin hendi við áseting av fiskimarki í 1977. Tá var landsstýrinum givin heimild at regulera fiskiskapin. Í 1987 byrjaðu vit at regulera atgongdina – ta frælsu vinnuna – løgfrøðiliga grundarlagið undir hesum var ógvuliga ivasamt.

1994-lógin um vinnuligan fiskiskap hevur orðingina „Ogn Føroya fólks". Hvat merkir hetta? Løgfrøðiliga merkir hetta millum nakað og einki, uttan at myndugleikunum (Løgting og Landsstýri) er givin heimild at regulera hetta økið – talan er ikki um at geva ognarrætt til nakran. Tað er rein fiktión, at hvør av okkum eigur ein part av øllum fiskastovnunum.

## SENDIÐ POLITISKA FYLGIBÓLKIN TIL HÚS

Vinnan eigur at vera við at gera fiskivinnulóggávuna. Hetta varð gjørt, tá vit gjørdu oljulóggávuna, sum hevur virkað væl. Tað er ikki nóg mikið, at trý fólk í Fiskimálaráðnum gera eina nýggja lóg. Her skuldi ein kommissión verði sett, sum ger arbeiðið á fakligum grundarlagi. Sendið politiska fylgibólkin til hús!

## EITT SINDUR „LUSKUT"

Halgir kom inn á býtið av makrelkvotuni: Hvørjar leiðreglur skulu nýtast at býta út eftir? Her koma vit aftur til „fólksins ogn" – myndugleikarnir hava ikki loyvi til at skalta og valta við hesi ogn. Tó má atgongdin regulerast, men tað skal vera forútsigiligheit og gjøgnumskygni í reguleringini – hetta var ikki so í 2012. Myndugleikarnir skulu regulera atgongdina eftir javnbjóðis, ikki-diskriminerandi prinsippum.

Ivi kann vera til byrjanina til alla føroysku fiskivinnureguleringina. Haldi hon er eitt sindur „luskut". Eg ivist í, um „makrelkunngerðin" frá 2012 hevur heimild í lógini. Kunngerðin fer ov vítt – mann veit ikki, hví ein fær rættindir og ein annar ikki fær.

So mikið frá Fiskivinnutinginum.

## ÚR NÚVERANDI LÓG UM VINNULIGAN FISKISKAP.

§2. Livandi tilfeingið á føroysku landleiðunum og tey rættindi, føroyska heimastýrið við samráðingum hevur rokkið ella eftir altjóða

rætti eigur uttanfyri føroysku landleiðirnar, eru ogn Føroya fólks.

§3. stk. 2. Fiskirættindi latin sambært hesi lóg veita ikki einstøkum bólkum ella einstaklingum ognarrætt. Somuleiðis kunnu rættindi til fiskiskap takast aftur uttan endurgjaldsskyldu.

§7b. Stk.5 Veiðiloyvi og fiskiloyvi kunnu ikki setast í veð.

# Tryggir og góðir karmar um okkara fiskivinnu



*Alfred Olsen, limur í politiskum fylgibólki*

Øll vita, at gongur tað væl í fiskivinnuni, so gongur tað væl í samfelagnum, og øvugt.

Tí skulu broytingarnar í fiskivinnulóggávuni viðføra, at stabilir karmar vera gjørdir fyri skip, bátar og manningar teirra, umframt at vit tryggja, at arbeiðspláss og virðisøkingin av okkara fiskatilfeingi verður her heima.

Hetta gerst millum annað við, at sum mest av fiski kemur upp á land í Føroyum.

So í staðin fyri at blaka ein part av hesum út aftur, eigur tað av vera ført til lands til virkingar, men hetta krevur, at vit hava virkir á landi, sum kunnu taka móti og virka alla hesa rávøru.

Uppritið frá landsstýrismanninum er ikki nakað endaligt, men leggur upp til eitt alment og politiskt orðaskifti, sum eg vil gera mítt til, skal enda við eini lóggávu, sum viðførir, at tað føroyska samfelagið fær mest møguligt burtur úr okkara fiskatilfeingi, at vit fáa eina økta virðing fyri fiskivinnuni og teimum, sum har starvast, og at tað skal geva meining at stríðast við at hava fiskiskip/bátar, umframt at tað skal loysa seg at vera sjómaður við føroyskum fiskiskipum.

Fiskivinnan og alivinnan koma at vera okkara høvuðsvinnur í nógv ár framyvir, og tí er tað neyðugt, at

hesar vinnur hava góðar og stabilar lógarkarmar at virka undir, tí tað vil vera til gagns fyri alt tað Føroyska samfelagið.

# Alt tilfeingið er Fólksins Ogn



*Poul Michelsen, limur í politiskum fylgibólki*

Framsókn er fyri marknaðarbúskapi og ímóti planbúskapi.

Fyri okkum hevur tað tí stóran týdning, at fiskivinnan nú loksins fer at virka á handilsligum grundarlagi, eins og allar aðrar vinnur.

Samstundis er tað sera týdningarmikið, at tey nýggju veiðuloyvini stuðla undir størri virðisøking og ein fjølbroyttan fiskiskap, sum er bæði lívfrøðiliga og búskaparliga burðardyggur.

Vit halda, at allur fiskur skal koma til lands í Føroyum, og at størri tilfeingisgjald tí skal leggjast á fisk, sum óvirkaður verður seldur av landinum. Verður loyvi givið at selja fiskin uttanlands, skal føroyskt eftirlit vera við landingini.

Í 2018 eiga loyvini at verða lutað út av nýggjum. Bæði tey, sum eru í vinnu í dag, og møguligir nýggir aktørar skulu hava møguleika at bjóða seg fram. Bert føroysk skip við føroyskari manning eiga at sleppa at bjóða. Loyvistíðin skal vera so mikið stutt, at hetta eggjar til góðan rakstur og úrtøku í loyvistíðini.

Fyri at prógva marknaðarvirðið eiga vit at royna at selja 10-20 prosent av loyvunum á uppboðssølu við stuttari loyvistíð, antin til nýggjar aktørar ella til teirra, sum á hendan hátt ynskja at optimera vinnu sína.

Útlendskur ognarrættur í føroyskari fiskivinnu eigur at verða avmarkaður mest møguligt, men við stuttari loyvistíð og avmarkingum annars hevur útlendskur ognarrættur ikki sama týdning.

# Treytin skal vera, at sáttmáli er við føroysku manningarfeløgini



*Aksel Johannesen, limur í politiskum fylgibólki*

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum ynskir, at politiska skipanin skal útluta veiði- og fiskiloyvir, ið hava eina langa uppsagnartíð (7-9 ár). Einasta argumentið fyri einari tílíkari skipan er, at vinnan má hava tryggleika ella vilja peningastovnarnir ikki veita fígging til fiskivinnuna.

Hetta tekur Javnaðarflokkurin ikki undir við. Fyri tað fyrsta, so gevur ein tílík skipan ikki øllum, ið ynskja tað, javnbjóðis møguleika at verða partar av føroyskari fiskivinnu.

Fyri tað næsta, so hava vit áður sæð, at ein skipan har fiskiloyvir verða útlutað ókeypis yvir eitt langt áramál, við møguleika fyri víðari sølu, hevur við sær eina yvirkapitalsering og stóra, og vaksandi skuldarbinding av fiskivinnuni.

Fyri tað triðja, so skal ein entreprenør-fyritøka gera stórar íløgur í maskinur og amboð, um hon skal bjóða seg fram innan byggivinnuna. Tá fyritøkan ger íløguna hevur hon ongan tryggleika um hvørjar uppgávur hon fær í framtíðini. Hon skal út í eina fría kapping við allar aðrar entreprenørfyritøkur á føroyska marknaðinum. Hóast tað fær hon fígging frá peningastovninum. Hví? Tí maskinurnar og amboðini hava eitt sjálvstøðugt virði, og peningastovnarnir fáa trygd fyri sínum útlánum í veð í maskinunum og amboðunum, sum tey fíggja.

Ein aktørur í frálandavinnuni fær fígging til at byggja skip, sum kosta fleir hundrað tals milliónir, hóast tey ongan tryggleika hava um framtíðar virksemi. Hví? Tí skipið hevur eitt sjálvstøðugt virði, og peningastovnarnir fáa trygd fyri sínum útlánum við veð í skipinum.

Hevur eitt fiskiskip ikki eitt sjálvstøðugt virði? Jú sjálvandi, og tí ber eisini til at fíggja eitt fiskiskip uttan at loyvini hava eina langa ella óendaliga gildistíð.

### GRUNDSÚLURNAR Í FISKIVINNUSKIPAN OKKARA:

- Eina frælsa og liberala vinnu, har allir føroyingar hava javnbjóðis rætt og møguleika at bjóða seg fram í fiskivinnuni.
- At loyvini hava eina stutta livitíð.
- At tað verður sett sum ein treyt í lógina um vinnuligan fiskiskap og øll fiskiloyvir, at treytin fyri fiskiloyvi er, at viðkomandi skip hevur sáttmála við føroysku manningarfeløgini.
- Verður treytin ikki hildin verður fiskiloyvi tikið aftur.

Gev gætur: Tilfeingisgjald skal – undir ongum umstøðum – rindast av manningini.

# Endurskoðan av lógini um vinnuligan fiskiskap



*Kristianna Winther Poulsen, limur í politiskum fylgibólki*

Eftir 1. januar 2018 er talvan rein, tí tá hevur einki skip longur nakað loyvi. Hendan støðan er ótolandi fyri allar partar, og hon er politiskt ábyrgdarleys. Tí má politiska skipanin so skjótt sum gjørligt koma fram til eina breiða semju um eina varandi loysn fyri fiskivinnuna, sum ikki er tengd at skiftandi samgongum. Eitt úrslit við einum teprum meiriluta við 17 atkvøðum fyri og 16 ímóti er ikki eitt nóg gott politiskt úrslit.

Um øll atgongdin til fiskivinnuna verður løgd til ávís reiðarí í óavmarkaða tíð, er avleiðingin, at tað verður ógjørligt hjá nýggjum fólki at fáa atgongd til fiskivinnuna. Hetta er bæði vinnuliga og samfelagsliga óheppið.

Vinnuligu aktørarnir skulu hava eina tíðarrammu, so at teir kunnu skipa seg við vissu um, at komandi áramál kunnu teir reka vinnu.

Ein avbjóðing er at skapa trygd fyri verandi aktørar og samstundis at skapa umstøður fyri, at nýggir aktørar kunnu koma framat. Nýggir aktørar hava ongan møguleika at koma framat, um loyvini verða óavmarkað í tíð.

At nýggir aktørar hava møguleika at koma framat, er ein neyðug fyritreyt bæði í mun til kappingarsjónarmið og í mun til líkheitsprinsippið – at øll skulu vera líka fyri lógini. Komandi ættarlið skulu ikki avskerast frá at fáa atgongd til landsins høvuðsvinnu, um tey ikki eru so heppin at vera arvingar hjá teimum, sum í dag hava loyvi at virka í fiskivinnuni.

Vinnan skal vera burðardygg – fiskurin skal vera í sjónum í nógv ár frameftir. Eisini er neyðugt at hugsa um burðardygd í mun til altjóða krøv, ið herðast alt meira, og sum vit mugu lúka, um okkara vøra skal kunna kappast við vørur úr øðrum fiskivinnutjóðum.

Hvat bankarnir siga og ikki siga, skal ikki verða avgerandi fyri, hvussu skipanin verður innrættað, men fígging er ein viðkomandi partur av málinum, og tí eigur politiska skipanin at hava fíggingina í huga, nú arbeitt verður við nýggjari fiskivinnulóggávu. Spurningurin er, um føroysku bankarnir verða førir fyri at fíggja meira enn ein part av fiskivinnuni, sum er sera kapitalkrevjandi.

Av allarstørsta týdningin er, at ein breið politisk semja verður funnin, sum heldur, eisini eftir næsta og nógv komandi val.

# Æviga ogn Føroyinga



*Páll á Reynatúgvu, limur í politiskum fylgibólki*

Uttan at vita av tí, leita vit eftir blágrøna litinum og fevnandi sjónarringinum. Bornir við sjóvarstrond, hava Føroyingar ans fyri havsins ríkidømi frá barnsbeini av. Tí kemur tað ikki óvart á, at flestu føroyingar, hava egna áskoðan á føroyska fiskivinnu og eisini, hvussu vit best gera gagn burtur úr havsins tilfeingi.

Tí er týdningarmesta uppgávan í eini komandi fiskivinnulóggávu at tryggja at rættindini at fiska verða verandi sum ævig trygd undir føroyska samfelagnum, og ikki kunnu avhendast, hvørki útlendingum ella einstøkum føroyingum. Tí skal gildistíðarskeiðið fyri fiskiloyvi vera stutt og ikki framhaldandi.

Hareftir meta vit tað avgerandi fyri vinnulív, at tað virkar á marknaðargrundarlagi, og at hesin marknaður er skipaður soleiðis at áræðið, dugnaskapur og nýhugsan, sleppa at vinna fram. Á tann hátt fáa vit mesta avkastið til bæði vinnu og samfelag. Okkara boð er ein uppboðssøla, har øll sleppa framat, heldur enn ein skipan við politiskt stýrdari útlutan av fiskirættindum. Undir øllum umstøðum fyri ein part av tilfeingi okkara.

Tilfeingisgjald við kassa eitt, heldur enn lítla vissu um tilfeingisskatt. Tað tryggjar at allir føroyingar fáa ágóða av landsins tilfeingi – eisini tey, sum ikki nýta rættin at fiska.

Trýstið á fiskastovnarnar, eigur at verða tilmælt og ásett í dyggum samstarvi við og virðing fyri fiskifrøðini. Eisini fyri at tryggja marknaðaratgongdina, og nøktandi prís fyri fiskin.

Mangur fiskimaður hevur sum smádrongur drigið sín fyrsta fisk á útróðri. Bæði mentanarliga og tí, at útróðurin er klekingardepil fyri framtíðar fiskimenn, skal serlig skipan gerast fyri útróðrarflotan, har hædd verður tikin fyri árstíðartengda viðbrekninum hjá útróðrinum. Havið er kjølurin undir føroysku skútuni, og fremsta uppgávan hjá politisku skipanini, er at tryggja vinnuni greiðar og gjøgnumskygdar arbeiðstreytir, so allir føroyingar rúmast innanborða á skútuni Føroyar.

# Eitt komplekst puslispæl



*Janus Rein, limur í politiskum fylgibólki*

Tað er torført taka nakað einstakt framum annað í uppritinum um nýggja fiskivinnulóg.

Hetta tí eg síggi eina nýggja fiskivinnuskipan, sum eitt komplekst puslispæl, ið ikki eydnast ella gongur upp í eina hægri eind, um ikki allir brikkarnir virka rætt, og saman. Tað nyttar einki at gera eina nýggja fiskivinnuskipan, og so hava eitt veikt lið sum skeiklar alla skipanina.

Um vit vilja tað ella ei, so liva vit øll í Føroyum beinleiðis ella óbeinleiðis av fiski- og alivinnuni. Aðalmálið má verða, at fáa BTÙið so høgt sum gjørligt og harvið gera tað lættari at reka samfelagið. Tað kann røtt fiskivinnuskipan og umsiting í stóran mun føra til.

Ein føroysk fiskivinnuskipan eigur tí at leggja upp til, at ráværan so vítt sum gjørligt verður víðarivirkað, gjarna til matvøru, her á landi. Tað er somuleiðis týdningarmikið, at tað fer at løna seg nógv betur enn í dag at hava bestu góðsku, og harvið fáa besta prísin. Tí, tá alt kemur til alt hava vit ein avmarkaðan ráværu-biomassa at eksportera. Jú hægri exportvirðið, jú meiri peningur kemur í umfar í samfelagnum, jú hægri BTÚ.

Vit eiga tó ikki at lóggeva fiskin upp á land í Føroyum. Tað eigur, undir ávísum treytum, eisini at verða gjørligt at avreiða uttanlands.

Eg haldi at føroyingar skulu eiga Føroysku fiskivinnuna. Tað skal sum best forðast fyri møguligum útlendskum eigaraskapi; eisini tí gjøgnum strámannavirksemi.

Umráðandi er eisini, at skipanin verður vælvirkandi og røttvís viðvíkjandi brúksskyldu, útblakingarbanni og verju av ungfiski. T.d. riggar skipanin viðvíkjandi verju av ungfiski stak illa í dag, og brúksskylda er í stóran mun ikki galdandi.

Í øllum førum eigur ein nýggj fiskivinnuskipan at vera burðardygg bæði vinnuliga og lívfrøðisliga.

# Havsins tilfeingi – ogn Føroya fólks



*Bill Justinussen, limur í politiskum fylgibólki*

Ongin politiskur myndugleiki kann nakrantíð taka sær heimild og skipa fyri, at ogn Føroya fólks kann gerast privatogn hjá nøkrum útvaldum.

Hon er ov dýrabær og heilag til, at nakar einstaklingur ella politiskur myndugleiki kann gerast eigari av havsins tilfeingi okkara.

Tí kunnu hvørki landsstýrismaður ella løgting stýra so við lóggávu ella umsitingarliga, at veiðiloyvir verða latin uttan uppsagnartíð.

Nýggja fiskivinnulóggávan má tí hava ta avmarking á latnum loyvum, at tey ein dag verða tikin innaftur. Og tað skotbráið kann ikki vera so langt, at tað í praksis er endaleyst.

Fleiri møguleikar eru at skipa loyvini. Ein kann vera, at fyrsti partur av einum loyvi hevur longri gildistíð, annar partur styttri gildistíð og triði partur t.d. eitt ára gildistíð.

So kunnu skiftandi skipanir vera fyri, hvussu styttru partarnir av loyvunum verða latnir ella seldir, alt eftir, hvønn politikk sitandi stjórn hevur.

Nýggja fiskivinnuskipanin eigur at gerast í breiðari semju millum allar flokkar á Løgtingi, so skiftandi stjórnir ikki støðugt broyta lógargrundarlagið.

Tað er køvandi fyri vinnuna, sum hevur tørv á støðugum vinnukarmum. Slík semja er møgulig, um lógin inniheldur mekanismur, sum gera tað møguligt at umsita lógina í mun til ta til eina og hvørja tíð ráðandi politisku fatanina.

Í 2018 eru øll fiskiloyvir uppsøgd. Tí hevur politiska skipanin nú ein søguligan møguleika at rætta kósina, so allir føroyingar verða eins fyri lógini og hava sama grundarlag at gerast partur av høvuðsvinnuni.

Miðflokkurin fer at virka fyri, at latin loyvir ikki gerast søluvøra hjá loyvishavarum, men ein brúksrættur, sum fellur aftur til landið, tá gildistíðin er farin. Yvirskipað mugu vit tryggja, at hvørt nýtt ættarlið fær somu møguleikar sum okkara á jøvnum føti at hava somu atgongd til havsins tilfeingi.

Ogn Føroya fólks kann ongantíð gerast ogn landsins, tí ogn landsins kann seljast privatum til ognar, og tað kann ogn Føroya fólks ongantíð.

## BROT ÚR DAGBÓK

**25-09-2012: FSN**
Fundur millum FSN og MF um gongdina í samlagstryggingini.

**02-10-2012: Portugálið**
Fundur í Sjóvinnuráðnum um kæru hjá MF um manningarásetanum á trimum sleipibátum. Limirnir í Sjóvinnuráðið tóku undir við kærunum hjá Maskinmeistarafelagnum.

**03-10-2012: LÍV**
MF og FSN høvdu fund saman við umboð fyri Lív um, hvussu samlagstryggingin skuldi samskipast fram yvir.

**03-10-2012: MF**
Nevndarfundur. Kunnandi fundur um støðuna viðvíkjandi ætlanirnar at keypa LÍV.

**04-10-2012:**
Vitjan. Formaðurin var á vitjan á 5 arbeiðsplássum í Klaksvík har maskinmeistarar eru í starvið. Ein sera góður og læruríkur dagur, at koma runt og síggja arbeiðspláss hjá starvsfeløgum og tosa saman. Eisini varð vitja hjá IRF.

**10-10-2012: Starvsmannafelagið.**
Kunnandi fundur fyri umboðum hjá teimum 23 fakfeløgum, sum ætla at keypa Lív. Til staðar vóru eisini sakførarar og grannskoðari, sum umboða fakfeløgini í hesum máli. Tey greiddu frá teirra kanningum og niðurstøðum í hesum máli.

**17-10-2012: MF**
Nevndarfundur í FMU í sambandi við ITF-fund í Keypmannahavn. Tað sum hevði serligan áhuga hjá feløgunum er komandi lógarbroyting í FAS-lógini. Tosað bleiv eisini um høvuðsorsøkirnar til, at FAS er á FOC-listanum, og kravið um „genuie link“ og galdandi lóggávu.

**24-10-2012: FSN.**
Blaðfundur um Mið & Magn. Eftirmeting av síðsta blaðið og nýggjar greinir til komandi blað.

**25-10-2012: MF**
Nevndarfundur: Til støðutakan vóru 13 mál millum annað samlagstryggingin, fyrisiting hjá MF og V&B. 3 mál vóru til kunningar millum annað tilgongdin um keyp av LÍV og vitjan í Klaksvík.

**30-10-2012: FUR**
Á vitjan á skrivstovuni hjá Føroya Ungdómsráð í sambandi við, at tey fara at geva út bókina „Hvat kann eg blíva“. MF stuðlar tiltakið.

**31-10-2012: Fundur hjá 3F, Keypmannahavn**
ITF hevði skipað fyri hesum fundi, fundurin snúði seg um, hvussu gongdin er viðvíkjandi altjóða skipaskránni FAS.

**5-6-11-2012: NMF, Stavanger**
Hettar var ein av teimum hálvárligu fundunum innan felagsskapin NMF. Næsti fundur verður í Føroyum í apríl komandi ár. Hvørt landi legði sina hálvárligu rapport fram, harumframt bleiv tosað um felagsskapirnir ITF, IMO og NTF. Nógv bleiv tosað um STCW 2010 og Manilla avtaluna um útbúgvingar og sjóvinnubrøv. Semja var um, at hvørt landi skuldi savna tilfar um útbúgvingar, og hetta skuldi framleggjast á næsta fundi í Tórshavn í apríl.



*Páll Hansen, formaður felagsins*

**12-11-2012: FSN**
Blaðfundur Mið & Magn. Tilrættislegging av komandi blaði.

**16-11-2012: Hotel Føroyar**
Fiskivinnuting. Jacob Vestergaard setti tingið, nógv fólk var komið saman á Hotel Føroyum hendan dagin. Har vóru nógv innlegg og hugleiðingar frá fólki við tilknýti til vinnuna og frá fakfeløgunum nú fiskivinnulóggávan skal endurskoðast.

**22-11-2012: FF**
Sáttmálar fyri fiskiskip. Tosað bleiv um, hvussu farast skuldi fram nú allar semjurnar ganga út 31. 12. 2013. Semja var um at royna at fáa samband við Føroya Reiðarafelag til innleiðandi samrøður um hesi viðurskifti.

**26-11-2012: LÍV**
Til viðgerar var nýggj avtala millum LÍV og yvirmannafeløgini um eftirlønarviðurskifti.

**29-11-2012: MF**
Nevndarfundur. Til støðutakan vóru 10 mál. Millum annað avtala við okkara grannalond um limaskap hjá maskinmeistarum, henda avtalan verður helst undirskrivað á NMF fundi í Føroyum í apríl mánað. Eisini bleiv tosað um undantaksloyvi



*Húsini hjá Maskinmeistarafelagnum á Grønlandsvegi 58.*

til skip við eini motorstødd undir 750KW. Semja var um at taka ein dialog við Skipaeftirlitið um hetta. Nevndin fekk kunning um tilgongdina fram ímóti keypi av LÍV og um mál, sum vóru løgd fyri fasta gerðarrættin.

**04-12-2012: LÍV**
Arbeiðsbólkurin hjá fakfeløgunum heilsar uppá nýggja stjóran. Seinni var fundur millum MF, FSN og LÍV um nýggja samstarvsavtalu um samlagstryggingina hjá feløgunum og LÍV.

**05-12-2012: EIK**
Fundur millum leiðslupersónar í EIK og umboð í arbeiðsbólkinum um keyp av LÍV og láni treytir. Seinri var kunningarfundur fyri øll fakfeløgini, hvar man vísti fíggjarleistin. Grannskoðari og løgfrøðingur greiddu frá teirra kanningum av LÍV.

**06-12-2012: MF**
Fundur við umboð fyri Strandferðsluna nú níggju hvílitíðarreglurnar skulu setast í verk.

**10-12-2012: MF**
Fundur við umboð fyri Sjóvinnuráðið um undantaksloyvir til skip undir 750 KW. Tað krevst motorpassaraprógv til skip millum 449KW og 749KW, men hendan útbúgvingin finst ikki.

**13-12-2012: FF**
Fundur millum manningarfeløgini nú allar avtalur ganga út. Manningarfeløgini hava tí verri ikki frætt hvussu tað gongst at samansjóða Føroya Reiðarafelag.

**14-12-2012: LÍV**
Á lítlari samkomu har nógv fakfelagsfólk var møtt, bleiv keypssáttmáli um keyp av LÍV undirskrivaður við Vinnumálaráðið. Hesin keypssáttmáli skal nú kannast av tryggingareftirlitinum og kappingaráðnum, so einaferð í mars mánað fer endaliga yvirtøkan fram.

**17-12-2012: Østrøm.**
Hugnalig móttøka í fabrikkini hjá Valdimar á Skálatrøð í sambandi við, at Tommy Petersen fór frá sum stjóri í Sjóvfyrisitingini og FAS. Sera hugnalig løta.

**18-12-2012: Smyril**
Fundur umborð á Smyrli um nýggju kunngerðina um hvíldartíð, sum kom í gildi 1. januar 2013. Til staðar vóru manningarfeløgini, umboð fyri SSL, Sjóvinnufyrisitingina og skipsleiðslan. Sjóvinnufyrisitingin boðaði frá, at teir vildu gera eina reglugerð um hvildartíð til skipini hjá SSL.

**02-01-2013: FF**
Nú tvey av manningarfeløgunum hava haft aðalfundir var tíð at byrja aftur við fyrireikingum til sáttmálasamráðingar.

**08-01-2013: FF**
Fyrireikingarfundur fram ímóti sáttmálasamráðingum, oljan fylti nógv á hesum fundi.

**10-01-2013: FSN**
Blaðfundur um Mið & Magn. Síðstu fyrireikingarnar til komandi blað. Av tí at prógvhandanin á Vinnuháskúlanum er flutt til síðst í januar verður blaðið framyvir útgivið í februar.

**14-01-2013: Turið Hentze**
Umboð fyri arbeiðsgevarar og umboð fyri lønmóttakarar vóru møtt fyri at velja semingsfólk. Verandi semingsfólk halda fram, men semja var ikki um hendan spurning.

**15-01-2013: Klaksvík**
Sáttmálasamráðingar millum manningarfeløgini og Felagið Verksmiðjutrolarar. Sáttmáli bleiv undirskrivaður. Hesin gevur trolarum, sum heilfrysta loyvi at brúka sáttmálan hjá Verksmiðjutrolarunum.

**17-01-2013: Bryggjubakki**
Sáttmálasamráðingar millum manningarfeløgini og Felagið Línuskip, drúgvir fundur men góður. Partarnir vendu teimum trupulleikum, sum hesin bólkur hevur. Tað varð eisini tosað um frystilínuskip. Nýggjur fundur bleiv avtalaður.

**22-01-2013: Bryggjubakki**
Framhald av fundinum við Felagið Línuskip, tvey ára sáttmáli og ein seravtala undirskrivað. Avtalan leggur upp til, at sáttmálabygnaðurin skal umrøðast frá nýggjum og finnast skal ein hóskandi lønarskipan fyri útlendingar.

**23-01-2013: MF**
Fundur millum umboð fyri SEV og Maskinmeistarafelagið.

**25-01-2013: Vinnuháskúlin**
Prógvhandan. Sera hugnalig og hábærslig løta, nógv fólk var komið saman; avvarðandi og umboð fyri stovnar og feløg.

## BROT ÚR DAGBÓK

**03-10 FSN**
Nevndarfundur, ætlanir verða lagdar fyri komandi aðalfundin.

**16-10 ALS**
Styrisfundur í Trygdargrunninum, málið um stjóralønina verður avgreitt.

**17-10 MF**
Manningarfeløgini hittast til at fyrireika okkum til fund við IFT um hvussu gongst við FAS skipanini nú hon er á listanum yvir hentleikafløgg.

**25-10 Fiskimálaráðið**
Fiskivinnuráðið fær kunning um hvussu gongst við at endurskoða lógina um vinnuligan fiskiskap.

**26-10 Hotel Føroyar**
Fasti Gerðarrættur hevur sín árliga arbeiðsmarknar dag, skeið var fyri fakfelagsfólk í at skriva kærurit. Tvey umboð vóru við frá FSN.

**31-10 Keypmannahavn**
ITF fundur, avgjørt var at FAS skal framhaldandi verða á FOC listanum. Ongin framstig eru gjørd innan føroysku lóggávuna um samráðingarrættin hjá føroysku manningarfeløgunum. Framvegis er ein ávís innflagging úr hinum norðanlondunum. ITF heldur hetta er ein óheppin gongd.

**02-11 Fíggjarmálaráðið**
Sáttmálasamráðingar um strandferðsluna og Havstovuna.

**06-11 Fiskimálaráðið**
Vinnan verður kunnað um endurskoðan av lógini um vinnuligan fiskiskap.

**14-11 Fíggjarmálaráðið**
Hildið verður áfram við sáttmálasamráðingum við Lønardeildina.

**22-11 FF**
Manningarfeløgini hittast til at tosa um komandi samráðingar fyri fiskiskipaflotan. Hækkandi oljuútreiðslurnar fáa nógva og drúgva umrøðu. Eitt umboð frá NEMA greiðir frá verkætlan um at digtalisera allar avrokningar. Um hetta eydnast fer tað at lætta um eftirlitsarbeiði hjá okkum.

**28-11 FSN**
Skiparar og stýrimenn av Róki og Lerki hitta okkum, nú Fiskimannafelagið fekk viðhald í landsrættinum, um at avtalan um eina dagløn fyri makrel veiðuna í 2011 ikki var galdandi. Limir okkara vóru misnøgdir við, at teir ikki fingu sama endurgjald sum limirnir í FF. Vit høvdu ikki kravt nakað endurgjald, tí FSN hevði skrivliga góðtikið daglønaravtaluna, eftir ynski frá limum okkara.

**04-12 LÍV**
Fundur um hvussu samlagstryggingargjaldi skal krevjast inn í framtíðini. Øll fakfeløg eru farin yvir til at taka gjaldið av eftirlønarinngjaldinum. Hetta lættir munandi um fyrisitingina og tryggjar, at allir limir gjalda inn. Ein avbjóðing hjá okkum er at fáa gjaldið frá teimum, sum hava eftirløn hjá øðrum veitara. Í FAS er tað sjálvboðið um ein vil gjalda til eftirløn, ella fáa peningin út. FAS-arar fingu ikki frádrátt fyri inngjaldið. Men hetta er alt broytt nú pensjónir verða skattaðar við inngjald.

**05-12 FSN nevndarfundur**
Roknskapur 2012 til støðutakan, og nevndin hyggur eftir einum skrivstovubygningi, sum stendur til sølu.

**05-12 Starvsmannafelagið**
Kunnað verður um endaliga keypssáttmála um keyp av Lív. Ein neyv gransking av innaru virðunum og rakstrar útlitum verða framløgd.

**11-12 Fiskimálaráðið**
Fiskivinnuráðið viðgerð uppskot um tilfeingisgjald á makrelveiðuna í 2013.

**17-12 Østrøm**
Móttøka fyri Tommy Petersen, ið gevst sum stjóri á Sjóvinnustýrinum.

**18-12 Smyril**
Fundur við manningina og SL og Skipaeftirlitið um nýggju kunngerðina um hvíld.

**28-12 Hotel Føroyar**
Aðalfundur hjá FSN, uppmøtingin var á góðari leið. Gott og gevandi orðaskifti var á fundinum. Ellintur helt, at hetta var ein tann lívligasti aðalfundurin hann hevði verið við til.

**10-01 FF**
P/F Vinnan hittir manningarfeløgini um sáttmála fyri ein nýggjan Saksaberg.

**11-01 FF**
Samráðingar við Felagið Línuskip.

**11-01 Starvsmannafelagið**
Fakfeløg hittast at umrøða rokið um uppsagda ALS stjóran.

**14-01 Fiskimálaráðið**
Fiskivinnuráði umrøður broytingar í kunngerð um stuðul til flutning av fiski.

**14-01 Skrivstovan hjá Turid D Hentze**
Val av semingsmonnum, Manningarfeløgini skutu upp at velja onnur semingsfólk. Arbeiðsgevarar og Føroya Arbeiðarafelag vildu heldur hava teir somu aftur. Handverkarafeløgini stuðlaðu okkara uppskotið.

**5-01 ALS**
Fundur í ALS stýrinum, fíggjarætlan fyri 2013 var framløgd. Hallið verður uml. 80 mill., støðutakanin bleiv útsett

**16-01 FF**
Samráðingar við línuskipini halda fram.

**18-01 Kósin Klaksvík**
Sáttmáli verður gjørdur fyri verksmiðjuskipini. Avtalað varð, at nýggi Sjúrðarberg eisini skal brúka flakasáttmálan.

**22-01 Havstovan**
Vinnan er boðin til fyrilestur um tilfeingisgjøld í Íslandi.

**22-01 FF**
Sáttmáli verður undirskrivaður við línuskipini.

**23-01 FF**
Samráðingar við Rækjuskip.

**24-01 FF**
Samráðingar við Partrolarar.

**25-01 ALS**
Víðari viðger av fíggjarætlan og stjórasetan.

**25-01 Vinnuháskúlin**
Próvhandan, FSN letur á fyrsta sinni ein sekstant til tann við hægsta próvtalinum.


*Eyðstein Djurhuus, formaður felagsins*

**25-01 FSN nevndarfundur**
Sáttmálakrøv til samráðingar fyri farma- og frálandaskip. Fokus fer at verða sett á vaksandi lønargloppið til norskar og danskar lønir.

**28-01 MF**
Fundur við SL um nýggjar arbeiðsætlanir, fyri at lúka krøvini um hvíld.

**29-01 FF**
Samráðingar við lemma og partrolarar.

# Rok í ALS

Satt rok hevur verið um uppsøgnina av stjóranum í ALS. Mong halda, at treytirnar í fráfaringaravtaluni vóru í so góðar. Serliga tá hugsað verður um, at hetta er ein sosialur kassi, sum fyri stuttari tíð síðan hevur skert útgjaldið til arbeiðsleys.

## STÝRISFORMAÐURIN KOYRDUR

Tað, sum av álvara fekk ilt í fólk, mundi vera at stýrið og uppsagdi stjórin royndu at pynta uppá veruleikan. Avgerðin hjá Jóhan Dahl um at koyra stýrisformannin frá í stundini var røtt og álitisvekjandi. Restin av stýrinum er sett eftir innstilling frá fakfeløgum og arbeiðsgevarum. Bæði fakfeløg og arbeiðsgevarar hava heitt á alt stýrið um at leggja frá sær. Tíverri eru tað bert tvey umboð, sum hava tikið atfinningarnar til eftirtektar. Okkara umboð Jan Højgaard er farin og undirritaði hevur tikið sæti sum varaumboð fyri fiski- og sjómenn. Valskeiðið hjá stýrinum gongur út í oktober mánað í ár.

## TRYGDARGRUNNURIN

Tíverri er Trygdargrunnurin eisini drigin inní hesa gøluna. Umráðandi er at sláa fast at Trygdargrunnurin bert hevur goldið stjóranum løn fyri tíðina hann hevur verið í arbeiði. ALS og Trygdargrunnurin hava ein sáttmála um, at ALS skal umsita grunnin og ALS stjórin skal hava løgfrøðiligu ábyrgdina fyri dagliga rakstrinum.

*Framhald á næstu síðu*

Stýrið fyri Trygdargrunnin hevur tíverri forsømt at áseta samsýning til stjóra og nevnd fyrr enn nú í heyst. Hetta merkir, at samsýningarnar skulu gjaldast afturút frá 1. apríl 2011.

Lønin til stjóran á kr. 15.000 um mánaðin skal samanberast við hvat tað vildi kostað, at sett ein stjóra burturav til Trygdargrunnin. Stýrið metti at hetta starv tók 20-25% av arbeiðstíðini hjá ALS stjóranum. Upphæddin var sett útfrá hesum fortreytum. Fyrivarni bleiv tikið fyri, at hin arbeiðsgevarin, ALS, góðtók stjóralønina. Trygdargrunnurin hevur bert 4 starvsfólk og tað er ein stórur fyrimunur at sleppa at vera partur av einum størri fakligum umhvørvi í ALS, sum hevur 30 starvsfólk.

### STÓRT HALL SEINASTU ÁRINI

ALS hevur havt stórt hall seinastu árini. Eginognin er nú umleið 300 mió. Inngjaldið er hækkað við upp til 1,25% frá bæði arbeiðsgevarum og løntakarum. Hægsta útgjaldið til arbeiðsleys er lækka frá 20.000 til 17.500. Eisini eru aðrar treytir broyttar fyri at spara. Um arbeiðsloysið í 2013 verður verandi á sama støði sum nú, so verður hallið 80 mió. í ár. Mín áskoðan er, at núsitandi stýri skal brúka tað, sum er eftir av valskeiðinum, til at koma við einum tilmæli um at fáa javnvág í raksturin.

Tað eru fleiri møguleikar, sum kunnu fáa skipanina í fíggjarliga javnvág. Hækkingar í inngjaldið geva umleið 40 mill fyri hvørji 0,25 %. Eisini ber til at lækka útgjaldið ella stytta um tíðina við rætti til útgjald. Tó er sera ivingarsamt um undirtøka fæst fyri nøkrum á hesum øki. Løgtingið skal samtykkja broytingar av hesum slagi. Seinastu árini hevur ALS víðkað munandi um sítt virkisøki. Starvsfólkatalið er økt munandi, samstundis sum fráboðanarskipanin nú verður gjørd umvegis sms boð ella teldupost. Skipanin við starvsvenjing og ymisk skeiðstilboð, kosta í 2013, 22 mill, so her er nokk okkurt at fara eftir.

Tað er sera umráðandi fyri meg, at almenningurin fær innlit í øll viðkomandi viðurskifti í ALS. Vit gjalda øll somul inn í ALS-kassan, og vit ynskja øll somul góð og mannsømilig kor til tey arbeiðsleysu.

# Trúfastur altíð var maður …

### REGIN NÓNSTEIN SJEYTI

Fríggjadagin 22. mars 2013 hevur ein trúgvur tænari hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Regin Nónstein, 70 ára føðingardag. Regin er hvalbingur, har hann varð borðin í heim 22. mars 1943.

Regin er uppvaksin í einum heimi, sum hevði sítt støði í føroyskari fiskivinnu. Pápin, Niels Pauli Nónstein, var trolaraskipari og ein av stigtakarunum, tá hvalbingar keyptu kolfýrda trolaran Drátt í 1946. Mamman, Natalia, var hvalbingur. Í 1946 tóku tey navnabroyting frá Ziskasen til Nónstein.

### ÚR HVALBA NORÐUR TIL KLAKSVÍKAR

Tað er so sjálvsagt at nevna at Regin, fór í barnaskúla í Hvalba 7 ára gamal í 1950, men tað sum kann tykjast minni sjálvsagt er, at hann einans 12 ára gamal fór norður til Klaksvíkar at ganga í millumskúla í 1955. Har fekk hann millumskúlaprógv í 1959.

Tey sum eru kunnaði um, hvat hendi í Klaksvík júst hesi árini, tá ið Regin gekk í millumskúla har hava sjálvandi hug at seta sær sjálvum fleiri spurningar. Vit hava kanska hug at spyrja, hvussu hesar hendingar ávirkaðu ein tannáring, sum brádliga kom úr einum friðsælum heimi í Suðuroy noður í ein bý, sum so at siga var kringsettur at donskum politistum.

Hetta er ikki minni áhugavert, tá vit vita at mangir føroyingar meta tað, sum fór fram vera eitt tað mest óhugnaliga og dramatiska, sum er hent í Føroyum.

Sum mangur veit, so gjørdist støðan so spent, at danski forsætisráðharrin mátti „traðka í karakter". Hann sá seg noyddan til at senda eitt krígsskip til Føroya fyri at fáa tamarhald á støðuni í oyggjunum, sum danir so mangar hava sagt seg hava stóran tokka til.

## GÓÐUR EYGLEIÐARI, SUM SKAPAR LOYSNIR

Hóast Regin var ungur tá, so hevur hann duga væl at eygleitt og analyserað, og tey, sum hava áhuga fyri søguligum viðurskiftum og eru komin í prát við Regin um Klaksvíksstríðið hava fingið greiðu á mongum av teimum fløktu málunum, sum skaptu hetta stríð.

Her er hóskandi at skoyta uppí, at tíðindi um Klaksvíksstríðið vóru so ógvuslig, at stórur partur av heimspressuni hevði myndir og frágreiðingar ovast á breddanum.

Tann sum hesar reglur skrivar hevði ein pápa, „sum sigldi út í verðini“ um hetta mundið. Ein dagin skipið lág við bryggju í Rio, og teir høvdu eina fríløtu, fóru teir í land at hyggja seg um í býnum. Tá rendu teir seg í eina plakat hjá einum av teimum stóru bløðunum í Suðuramerika, ovast á breddanum stóð við stórum stavum FAROE ISLAND og so okkurt, sum teir ikki skiltu, tá teir so spurdu seg fyri fingu teir at vita at tað var borgarakríggj í Føroyum. Tí betur tóku teir hetta ikki í álvara, so mikið vistu teir um føroysk viðurskifti og uggaðu teir seg við tað.



*Regin Nónstein: 70 ár 22. mars*

## KLAKSVÍKIN KYNDI EIN NEISTA

Tað sum í hesum sambandi hevur størri týdning at nevna er, at í Klaksvík kom Regin at uppliva tað ovurstóra blómandi fiskivinnuvirksemi, sum eyðkendi býin hesi árini. Her gjørdist hann hugtikin av teimum møguleikum, sum lógu í sjó- og fiskivinnu.

Tað er helst ikki ov nógv sagt, at øll skipini og fiskivinnan, sum eyðkendu Norðoyggjar ávirkaðu hann so mikið nógv, at hann á ungum árum „setti úr í kortið“, og segði við seg sjálvan, at tað var tann vegin hann ynskti at fara. Tá fekk veiðihugurin og sjógvurin fastatøkur á honum.

Hetta var so mikið greitt, at í 1959 stóð honum í boði lærupláss á skrivstovu á Skipasmiðjuni á Skála, men hann takkaði nei. At fáa eitt slíkt tilboð var ikki hvørjum beskorið, tí hava helst eisini mong undrast, men ikki Regin.

Í fyrstu atløgu valdi hann at fara suður til Hvalbiar at hjálpa til í handlinum hjá foreldrunum. Hetta hevði eisini samband við, at pápin júst tá hevði fingið skiparatjans við Jóannesi Paturssyni. Tá hevði pápin verið uppilagstur í 9 ár; hann hevði virkað sum handilsmaður síðan 1951.

Tá pápin var farin aftur til sjós var ovmikið at takst við í handlinum, og Regin mátti tí skjóta sín dreym nakað inn í framtíðina. Hetta tíðarskeiðið var eisini mangt annað, sum dró. Eins og hjá øðrum hvalbingum dró myrkrið í svarta náminum í Prestfjalli, tað dugdi hann eisini at fáa sær ein smakk av, og tað sama var við fleiri øðrum møguleikum, sum landkrabbar meta hava størri týdning enn spenningurin, sum er ímillum aldubrotini.

Men í 1962 var tolið uppi; 17. apríl mynstraði hann við trolaranum Brandi Sigmundarsyni. Har fekk hann sínar fyrstu royndir á sjónum ímillum trolaramenn – tað, sum hann í mong ár hevði tráa eftir og sæð fram til. Og tað vísti seg eisini skjótt, at hann ikki hevði gjørt nakra roknivillu; dreymurin og veruleikin sampakkaðu sum fótur í hosu.

Umborð á Brandi kkom hann eftir, at á brúnni var útsýni betur enn á dekkinum, tí var næsti leikur í talvinum lættur at taka støðu til.

## TÁ BRÚGVIN FÓR AT DRAGA

15. september 1967 mynstraði hann av Brandi Sigmundarsyni, og søkti um upptøku á Føroya Sjómansskúla; har hann fekk sína fyrstu „lektión“ í navigatión stutt fyri Mikkjalsmessu, og fjøllini skuldu gangast.

Tá tók stýrimansútbúgvingin 1½ ár, og í apríl 1970 fekk hann skipsførarareprógv í hondina, og takkaði fyri seg á Føroya Sjómansskúla.

So nú skuldi lærdómurin standa sína roynd, og í november hetta sama árið verður farið av Vági við trolaranum Vágbingi. Fyrsta leiðin lág suðureftir, til

Esbjerg, og so víðari til Skagen eftir ídnaðartrolaranum Bjarnoy, sum tá var keyptur til Vágs. Teir mynstraðu í Skagen 26. november 1970, og fóru beinleiðis til fiskiskap í Norðsjógvin á ídnaðarveiðu. Við hesum skipið var Regin stýrimaður til komið var inn í februar 1972.

Tá ljósið og summarið stóð uppá tað besta náddi hann at gera ein túr sum stýrimaður við Jens Christian Svabo.

Nú kom aftur ein spennandi avbjóðing; 15. mai 1973 legði hann frá landi við ídnaðartrolaranum Gudmundi av Tvøroyri, sum stýrimaður; her var hann drúgvari enn áður; í august 1979 takkaði hann manning og reiðarí fyri góðu árini umborð.



*Ídnaðartrolarin Gudmundur, sum Regin var við árini 1973-1979*



*Regin var við Brandi Sigmundarsyni árini 1962-1967*

Á sumri 1980 søkti Vaktar- og Bjargingartænastan eftir avloysarum; hetta metti hann vera forkunnugt og hevði hug at royna, og tað hepnaðist, hann mynstraði sum 1. stýrimaður við Tjaldrinum, og fekk soleiðis eisini royndir við einum skipi, sum bæði hevði politimyndugleika og kanón. Hetta var kortini eitt avmarkað avloysatíðarskeið; danski politimydugleikin og kanónin hava helst ikki imponerað.

Tann 1. mai 1981 legði hann leiðina niður til Fredericia. Har var farið umborð á oljuskipið Magn, sum Shell hevði ognað sær. Skipið var frammanundan væl kent millum oyggjarnar sum Helle Vonsild. Helle Vonsild hevði siglt við olju frá Danmark, meðan Magn kom at lasta olju í Mongstad, sum liggur norðan fyri Bergen. Við Magn kom Regin at sigla sum yvirstýrimaður og skiparaavloysari til á sumri 1983.

## FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG

Á aðalfundi í Skipara- og Navigatørfelagnum í 1983 var Regin valdur til eykaðmann í nevnd felagsins. Tá byrjaði eitt drúgt tíðarskeið í hansara lívið sum tænari fyri føroyskar navigatørar. Í 1984 var hann valdur inn í nevndina, og hevur øll tey mongu árini síðani verið nevndarlimur og næstformaður.

Í 1986 var brúk fyri einum kønum manni á skrivstovuni, hetta tók Regin uppá seg, og hevur við nærlagni og dugnaskapi røkt hetta arbeiði síðani, og felagið vónar at hann verður drúgvari enn so, og ikki stingur í sekkin, tá kreftirnar framvegis eru góðar. Tað sum hevur so ómetaliga stóran týdning fyri felagið er, at Regin Nónstein hevur eitt innlit sum valla nakar annar, tá tað snýr seg um tað, sum Føroya Skipara- og Navigatørfelagið, elsta fakfelagið í Føroyum, eigur og skal taka sær av so mikið nágreiniliga, at ongin fingur skal kunna setast á nakað.

Við sínum nærlagni, lætta lyndið og sínum frálíka góðu evnum at loysa stórar og krevjandi trupulleikar er Regin mangan tann, sum megnar at loysa fastlæstar støður, og altíð liggur tað honum fremst at loysa- tá onnur hava skapt trupulleikar.

Føroya Skipara og Navigatørfelag takkar Regin Nónstein, næstformanni felagsins, fyri drúgvu tænastuna fyri felagið, og ynskir honum hjartaliga tillukku við sjeyti ára føðingardegnum 22. mars 2013. Somuleiðis ynskja vit honum blíðan byr í tíðini, sum liggur fyri framman.

Maskinistur | Maskinmeistari | Skipari | Skipsførari



# Spennandi og fjølbroyttar útbúgvingar

## og eitt hav av eftirútbúgvingarmøguleikum

**Dømi um skeið:**

1 ARPA skeið
ARPA Automatic Radar Plotting Aids

2 GOC (Generelt og endurnýggjan)
GOC General Operator Certificate (NEW)

3 Tankers Safety serskeið fyri olju- gas- og kemikaliutangakip
Tankers Safety, special course for oil-, gas- and chemical tankers

4 Flutningur av vandamiklum farmi
Transport of dangerous goods in dry cargo ships

5 Eftirútbúgving sum sjúkraviðgeri (Heilsulæra)
Supplementary training in medical proficiency

6 ECDIS (elektroniskt sjókort)
Course in Elektronic Cart Display Indication System

7 SSO-skeið
Course for Ship Security Officers

8 Fult trygdarskeið fyri sjómenn. STCW A-VI/1-1,A-VI/1-2, A-VI/1-3,A-VI/1-4
Basic safety training

9 Bátafør araskeið. STCW A-VI/2-1
Proficiensy in Servival Craft and Rescue boats

10 Bridge Resource Management
Bridge Resource Management

*Set teg í samband við skúlan og hoyr nærri.*

Nóatún 7 · FO-100 Tórshavn
Tel 350 250 · Faks 350 251
info@vh.fo · www.vh.fo

**VINNUHÁSKÚLIN**
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Vinnuháskúlin er ein nútímans skúli við serkønum lærarum í øllum lærugreinum, eins og skúlin hevur allar teir hentleikar og útbúnað, sum skulu til fyri at gera útbúgvingina áhugaverda og góða. Útbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum eru góðkendar av Føroya Landsstýri, Søfartsstyrelsen og IMO.

KREA



# IRF: Nýtt spilloljuverk

Fyrst í nítiárunum varð ein skipan sett í verk at samla spillolju, men hon kom í fíggjarligar trupulleikar nøkur ár seinni. IRF yvirtók skipanina og bygdi Spilloljuverkið á Kambsdali til tørvin, sum man tá metti fór at vera. Nøgdirnar av spillolju eru øktar munandi og samansetingin er nógv broytt síðani. Seinastu árini hevur verkið tikið ímóti 3.500 rúmmetrum.

Seinastu nógvu árini hevur verkið ikki havt nógv út at geva í dagliga rakstrinum. Útgerðin var slitin, og neyðugt varð at gera lutfalsliga stórar íløgur ella umvælingar. Hóast tað møguliga hevði verið nakað bíligari at umvælt og umbygt og útbygt, metti IRF ikki, at tað var ein nøktandi loysn. Hetta kemur millum annað av, at umstøðurnar á Kambsdali eru nógv broyttar m.a. við tað at bústaðir og virkisbygningar eru komin alsamt nærri verkinum. Hinvegin hevur IRF tøkan hita á Hagaleiti, sum hóskar væl til upphiting á einum spilloljuverki. Tørvurin er upp til 0,5 MW. Tí hevur IRF tey seinnu árini arbeitt mest við møguleikanum at byggja eitt nýtt verk á Hagaleiti.

## NÝGGJA VERKIÐ

IRF ger og fíggjar íløguna í nýggja verkið. IRF hevur rakstrarsáttmála við Føroya Landsstýri um at fíggja ein part av rakstrinum yvir løgtingsins fíggjarlóg. Skip, havnir og virki gjalda ikki fyri viðgerð av brúktari spillolju, tí hetta verður fíggjað við avgjaldi fyri smyrjolju, men mugu harafturímóti gjalda fyri oljudálkað vatn og tungoljuevju.

Nýggja verkið hevur fleiri fyrimunirnir, m.a.:

- Innsavning og viðgerð av spillolju gongur sum vant, meðan bygt verður
- Verkið verður bygt frá grundini út frá vitanini, sum er tøk í dag
- Verkið fer at hava ríkiliga orku at viðgera dagligu nøgdirnar
- Verkið kann økja orkuna nokk so munandi við at arbeiða í skiftivaktum
- Stóra orkan minkar um manskapstørvin og vaktararbeiði



- Stóra orkan kann hava sera stóran týdning í sambandi við oljuóhapp (tilbúgving)
- Alt verkið er undir taki
- Verkið verður mest sum fult automatiserað
- Verkið fer at brúka fjarhita frá Brennistøðini
- Vanligi raksturin verður bíligari
- Stórur dentur verður lagdur á at

- reinsa útlát frá verkinum so væl sum gjørligt
- Verkið hevur eisini møguleika at taka ímóti brúktum oljusperrum til avrenning, áðrenn tær fara á Brennistøðina.

## TEKNIKKUR

Eystanfyri verkið er ein rúmligur básur at taka ímóti olju og at avskipa olju. Tað ber soleiðis til bæði at taka ímóti spillolju og at avskipa reinsaða olju samstundis. Básurin hevur ein flór við rist omanyvir í eystara enda, sum ger tað møguligt at leggja nakað av brúktum oljusperrum at vatnrenna, áðrenn tær verða koyrdar á Brennistøðina.

Verkið er 28,80 x 13,66 metrar innan ella góðar 390 fermetrar til støddar. Í mun til gamla verkið er øll útgerðin undir taki. Inni á verkinum eru fýra tangar til at taka ímóti og grovskilja spilloljuna. Hesir tangarnir eru 60 rúmmetur (LxBxH = 4,8x3,5x3,6m) við kappahita (150 kW) hvør og bjálvaðir. Hitin er 45 oC. Í tangunum eru mátarar, so tað sæst á telduskýggja, hvussu fullir teir eru og hvar í skilnaðurin millum olju og vatn er.

Alt sum kemur á móttøkubásin, spillolja, oljudálkað vatn og tungoljuevja, fer í ein av hesum tangum við grovrist. Haðani verður spilloljan pumpað yvir í ein annan tanga, har hon fær frið at standa og grovskilja t.d. eina nátt ella meira. Síðani verður oljuparturin pumpaður yvir í ein tanga og vatnparturin yvir í ein annan.

## SKILJINGIN

Skiljingin av oljuni heldur fram, tá oljan verður pumpað í annan av tveimum høgum tangum. Hesir tangarnir eru eisini 60 rúmmetur (Ø=3,4m og h=7,9 m) við kappahita (275 kW) og bjálving. Hitin í hesum tangunum er 67 oC. Teir eru eisini útgjørdir við mátarum sum vísa, hvussu fullir teir eru og hvar í skilnaðurin millum olju og vatn er. Oljan frá tangunum verður reinsað við Gea-Westfalia separatori, sum kann viðgera 5 rúmmetur/h. Oljan verður haðani pumpað yvir í annan av tveimum goymslutangum, sum eru 70 rúmmetur.

Fráskilda vatnið verður samlað upp í ein 25 rúmmetur goymslutanga og kølt niður til 34 oC. Síðani verður tað reinsað við kemiskari felling, áðrenn tað verður latið út. Alt vatn frá verkinum skal ígjøgnum hesa skipanina. Á kloakkini er eisini ein botnfellingartangi og ein koalisens oljuskiljari.

## STRONG KRØV TIL LUFTSKIFTIÐ

Av tí at alt er undir taki, eru sera strong krøv til luftskiftið í bygninginum. Ein Zerax ventilatiónsskipan skiftir 20.000 rúmmetur út um tíman. Harafturat er verkið útgjørt við AGA og VBA ávaringarskipanum.



Búsetur hevur havt høvuðsentreprisuna, sum er jørð- og kloakkarbeiðið og bygningur, um hendi. Blikksmiðan hevur havt ventilatión og hita, KJ elráð elektrisitet og DVS hevur havt processútgerðina um hendi.

Ætlanin er, at verkið skal kunna taka ímóti eini 5.000 rúmmetrum um árið í vanligari arbeiðstíð, svarandi til umleið 100 rúmmetrar um vikuna. Men verkið kann taka ímóti 120 rúmmetrum í ein dag og viðgera meira enn 300 rúmmetrar um vikuna í eitt styttri tíðarskeið. Tá verður arbeitt allan sólarringin.

IRF selir reinsaða olju til virki, sum hava fýringar størri enn eitt MW, t.d. Havsbrún, Fjarhitafelagið og Høvdavirkið.





*Útgerðin á nýggja spilloljuverkinum var royndarkoyrd um árskiftið, og í januar var gamla verkið á Kambsdali stongt og nýggja verkið tikið alment í nýtslu*




**Við ynskjum um eitt eydnusamt nýggjár takkar Norðborg fyri farna árið**

FØÐINGARDAGAR

# Skipara- og Navigatørfelagið og Maskinmeistarafelagið



## GUDMUND JAKOBSEN 70 ÁRA FØÐINGARDAG

1. februar í ár rundaði Gudmund Jakobsen tey 70. Gudmund er navigatørur; tók skipsføraraprógv á Føroya Sjómansskúla í 1985.

Gudmund er skopuningur, men býr í Havn. Hann hevur siglt í 34 ár hjá donskum reiðaríum; 25 ár hjá Mercandia, 9 ár hjá Armada Shipping. Seinastu 9 árini hevur hann siglt við skipum hjá Strandferðsluni. Í løtuni siglir hann á Nólsoyarleiðini; 28. februar 2013 fer hann úr føstum starvi.

Í samrøðuni nevndi Gudmund, at hevur onkur brúk fyri honum, so hevur hann onki ímóti at vera avloysari, tá tað liggur fyri.

Vit ynskja honum hjartaliga tillukku við 70 ára føðingardegnum.

## SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAGIÐ: FØÐINGARDAGAR

| | | |
|---|---|---|
| Gudmund Jakobsen | 01-02-43 | 70 ár |
| Regin Nónstein | 22-03-43 | 70 ár |
| John Haraldsen | 23-01-53 | 60 ár |
| Sámal J. Jacobsen | 28-02-53 | 60 ár |
| Djóni Weihe | 14-03-53 | 60 ár |
| Jens E. Zachariassen | 03-03-63 | 50 ár |
| Róðin Biskopstø | 09-03-63 | 50 ár |
| Edmar Joensen | 12-03-63 | 50 ár |
| Niels Pauli Norðberg | 21-03-63 | 50 ár |
| Hans P. Johannesen | 12-01-73 | 40 ár |
| Leivur Frits Strøm | 16-02-73 | 40 ár |
| Jóhan Isaksen | 17-02-73 | 40 ár |
| Jógvan á Lakjuni | 22-02-73 | 40 ár |
| Mads A.W. Olsen | 23-02-73 | 40 ár |
| Ingi T. Ragnarsson | 24-02-73 | 40 ár |
| Mads K. Hentze | 02-03-73 | 40 ár |
| Rúni Ludvig | 03-03-73 | 40 ár |

## MASKINMEISTARAFELAGIÐ: FØÐINGARDAGAR

| | | |
|---|---|---|
| Regin Kunoy | 19. mars 1943 | 70 ár |
| Øssur Vágsheyg | 28. apr. 1943 | 70 ár |
| Karl R. Johansen | 30. apr. 1943 | 70 ár |
| Thomas Juul Thomassen | 6 jan. 1953 | 60 ár |
| Anfinn Olsen | 5. feb. 1953 | 60 ár |
| Jørgen Martin Niclassen | 3. mars 1953 | 60 ár |
| Ingolf Heinesen | 6. mars 1953 | 60 ár |
| Páll Marius Vík | 7. mars 1953 | 60 ár |
| Tummas Joensen | 11. mars 1953 | 60 ár |
| Karl Ólavur í Trøðini | 14. apr. 1953 | 60 ár |
| Sverri Mikkelsen | 5. jan. 1963 | 50 ár |
| Kristian Højgaard | 14. jan. 1963 | 50 ár |
| Jóhan Hansen | 18. jan. 1963 | 50 ár |
| Bergur Ludvig | 28. feb. 1963 | 50 ár |
| Bárður Jensen | 6. mars 1963 | 50 ár |
| Jói Elian Hansen | 19. mars 1963 | 50 ár |
| Conrad Gaard Joensen | 2. apr. 1963 | 50 ár |
| Eyðbjørn Andreasen | 25. jan. 1973 | 40 ár |
| Guttorm Sundstein Joensen | 22. apr. 1973 | 40 ár |
| Ásmundur Sivertsen | 26. apr. 1973 | 40 ár |
| Jens Mørkøre | 27. apr. 1973 | 40 ár |

# Tommy Petersen í spennandi starvi í Jerusalem

Tommy Petersen, sum í fleiri ár stóð á odda fyri FAS skipanini og var stjóri í Sjóvinnustýrinum er nú búsitandi í Jerusalem, har hann er settur í starv hjá DANIDA. Jerusalem er altíð ein áhugaverdur býur. Tí mettu vit, at tað kundi vera áhugavert at frætt, hvussu gekk í nýggja forvitnisliga starvinum. Tað eydnaðist at koma í samband við Tommy, og hann var alt fyri eitt beinasamur.

Í samrøðunni nevndi Tommy m.a. at hann er Senior Adviser hjá DANIDA, og skal ráðgeva palestinska menningar- og kommunuráðharran, Khaled Qawasmi, í miðspjaðingar- og kommunusamanleggingarmálum. Eg kann skoyta uppí, at kommunusamanlegging er ikki lættari at fremja her enn í Føroyum, sigur Tommy álvarsamur á málinum.

Ein annar partur, sum eg skal taka mær av, er at vera samskipari hjá DANIDA, tá talan er um Heimsbankan, ST, ES og øll hini veitingarlondini, sum eru nógv í tali í Evropa og Asia.

Her er nógv at seta seg inn í, og eg gleði meg til at „fara út í markina" at vitja kommunur, borgarstjórar, og bý- og bygdaráðslimir. Tað verður á tí økinum, at tann størsti parturin av mínum arbeiði skal gerast. Í tí sambandi verður byrjað í Nablusøkinum, og so fara vit suðureftir til Hebron og aðrar býir sunnanfyri.

Lat meg skoyta uppí her, at Danmark telist millum teir størstu veitararnar í pengum, og tí er Danmark „co-chairman" saman við ráðharranum, sum er formaður í samskipanarbólkinum, og hevur yvirskipaðu leiðsluna av arbeiðinum.

## BÚSTAÐUR OKKARA

Vit búgva í sama bygningi, sum finski umboðsmaðurin í Wadi al Joz, beint undir Oljufjallinum. Tað er í Eystur-Jerusalem, sum er tann palestinski býarparturin.

Okkara íbúð er umleið 200 fermetrar, tríggjar stovur, trý baðirúm og fýra sovikømur. Eisini hava vit eina fín balkong. Annars er høgt til loftið, gólv við flisum og marmor. Og so eru allir hentleikar í húsinum.

Uttanfyri er stórur urtagarður við pálmum og blómum alt árið. Annars er urtagarður okkara sera vakur og væl hildin, tað gevur eina serliga góða kenslu - jú her er gott at vera, greiðir Tommy okkum frá.

Veðrið seinastu dagarnar hevur verið gott, millum 15-24 hitastig, í dag vóru 20 hitastig. Men her kann eisini vera vetur, fyri 10 døgum síðani høvdu vit kavarok, men tað er sjáldsamt, av tí sama steðgaði – so at siga – alt samfelagið upp. Men tað tók ikki langa tíð, so var alt sum tað hevði verið. Vit gleða okkum til várið í mars mánað, tá verður heitari veður.

## JESU GRØV

Vit høvdu eitt stuttligt upplivilsi, tá ið vit vitjaðu Garden of the Tomb, sum er stutt frá har vit búgva. Tað er eitt av teimum 4 plássunum, har hildið verður, at Jesus varð krossfestur og lagdur í grøv. Har kom ein vaktarmaðurin ímóti okkum og gitti, at vit vóru danir, tí gav hann okkum eitt kunningarrit á donskum. Eg spurdi hann, mest sum í spølni, um tað mundi finnast á føroyskum, „sjálvandi" var svarið og so gav hann okkum sama tekst



*Tommy Petersen*



*Við Jesu gravstað*



*Uttan fyri bústaðin*



*Í urtagarðinum er hópin av vøkrum pálmum*




*Skrivstovubygningurin har hann í løtuni arbeiðir*

á føroyskum – „stikk den hugsaði eg".

Vit eru væl móttikin og gleða okkum til at vitja víða hvar, og vísa komandi gestum runt. Vit kunnu bara siga, at fólkið er fyrikomandi og beinasamt.

## DIPLOMATPASS

Av trygdarávum havi eg „diplomatstatus" og arbeiði út frá donsku umboðsstovuni í Ramallah, har eru onnur lond umboða m.a. Finnland. Eg veri hvønn morgun, saman við starvsfeløgunum, sum eru danir og palestinar, samlaður upp og koyrdur til og frá arbeiðsplássinum, sum í luftlinju er minni enn 25 kilometur burtur.

Vit skulu í hesum sambandi fara ígjøgnum eitt sokallað checkpoint, men í diplomatbili er tað rættiliga lætt, annars er eftirlitið rættiliga nágreiniligt.

Ramallah, sum er fyribils høvuðsstaður hjá palestinum, er býur uppá uml. 100.000 fólk. Frá eldri tíð er talan um tveir býir Al-Bireh og Ramallah, sum nú eru samanvaksnir, men framvegis tvær kommunur har borgarstjórin í Ramallah er kristin og í Al Bireh muslimur, og soleiðis hevur tað verið í øldir.

# Tryggingarfelagið LÍV

Á várið 2012 tóku nøkur fakfeløg seg saman fyri at kanna møguleikan at keypa part av Føroya Lívstrygging. Hesi fakfeløg settu sær sum málsetning, at um fakfeløgini komu inn í myndina, sum keypari av Føroya Lívstrygging, so skuldi tað koma at loysa seg enn betur hjá fakfelagslimunum at hava sína eftirlønaruppsparing hjá Føroya Lívstrygging.

## FYRSTA STIGIÐ

So eitt tað fyrsta, sum varð gjørt, var at seta seg í samband við leiðsluna hjá Føroya Lívstrygging fyri at kanna um tað bar til á fáa umsitingarkostnaðin av felagnum niður.

Tað metti leiðslan á Føroya Lívstrygging verða møguligt, um fakfeløgini kundu ganga við til, at allar eftirlønarskipanirnar hjá teimum ymisku fakfeløgunum blivu eins.

## NÓGV EINFALDARI OG LÆTTARI UMSITING

Tað vildi geva ein møguleika fyri at fáa eina nógv einfaldari og lættari umsiting, sum fór at vera munandi bíligari at reka, enn tað hevði verið møguligt við teirri skipan, sum hevði verið galdandi frammanundan.

Tað gav fakfeløgunum, sum høvdu limir við eftirlønaruppsparing í Føroya Lívstrygging møguleika at undirskriva nýggja eftirlønaravtalu við Føroya Lívstrygging, sum kemur í gildið 1.1.2013, sum hevur við sær, at umsitingarkostnaðurin næstan fer niður í helvt.

## STÓRAN TÝDNING HJÁ HVØRJUM EINSTØKUM

Hetta hevur stóran týdning hjá hvørjum einstøkum fakfelagslimi. Skipanin er einføld at skilja; tá minni verður tikið í umsitingargjaldi so verður ein størri partur av samlaða inngjaldinum eftir hjá hvørjum einstøkum fakfelagslimi.

Um miðjan desember 2012 varð komið so mikið langt í hesari tilgongd at fyrireika keypi av Føroya Lívstryggingeini, at skrivað var undir ein treytaðan keypssáttmála við Vinnumálaráðið, um keyp av 50% av Føroya Lívstrygging.

## STUTT EFTIR Á MÁL

Áðrenn henda avtala og handil kann avgreiðast endaliga skal Tryggingareftirlitið góðkenna fakfeløgini sum keyparar. Harumframt skal Kappingareftirlitið góðkenna handilin.

Tað sum so skal henda, tá Tryggingareftirlitið og Kappingareftirlitið eru liðug við sína viðgerð og vónandi hava góðkent handilin, skal ein aðalfundur verða í P/F Fakfelag, sum er tað felagið, sum keypandi fakfeløgini í felag hava stovnað, og hevur eittans endamál, sum er at røkja felags áhugamálini hjá fakfeløgunum í Føroya Lívstrygging. Tá skulu øll tey keypandi feløgini, gera tær endaligu viðtøkurnar og velja nevnd í P/F Fakfelag.

Tað sum so nevndin í P/F Fakfelag skal gera, er at velja 2 nevndarlimir í nevndina í Føroya Lívstrygging.

## SOLEIÐIS ER LÍV SKIPAÐ

Nevndin í Ognarfelagnum Lív, sum umboðar allar tryggingartakararnar í Føroya Lívstrygging, velur 2 limir í nevndina og hesir 4 nevndarlimirnir velja so tann 5 nevndarlimin í felag. Henda 5 manna nevnd er so hægsti myndugleiki í Føroya Lívstrygging.

Umframt tey 18 keypandi fakfeløgini, eru tað fleiri onnur fakfeløg, virkir og einstaklingar, sum hava sínar eftirlønaruppsparingar og samlagstryggingar hjá Føroya Lívstrygging.

Miðað verður ímóti, at øll viðskiftafólk hjá Føroya Lívstrygging koma at fáa ágóðan av hesari yvirtøku. Í framtíðini verður arbeitt áhaldandi fyri at betra Føroya Lívstrygging til gangs fyri hvønn einstakan eftirlønaruppsparara.



*Pætur Niclasen, formaður í S og K felagnum*



*Jan Jakobsen, stjóri í LÍV*

## FAKTA UM JAN JACOBSEN, STJÓRA:

**Jan Jakobsen:** Stjóri í LÍV:
Giftur við Onnu S. Dalsgaard, lærara. Tey eiga 3 døtur: Rakul *(22 ár)*, Katharina *(16 ár)* og Hjørdis *(12 ár)*.

**1993:**
Útbúgvin cand. merc. á Handilsskúlanum í Keypmannahavn við fígging og roknskapi sum sergrein.

**1993 - 1997:**
Undirvíst á Handilsskúlanum í Ballerup.

**1997 - 1999:**
Fyrisitingarleigari hjá ALS.

**2000-2001:**
Leiðari á tryggingar- og ávísingardeildini hjá ALS. Starvast í Bank Nordik í fleiri umførum í tilsamans umleið 11.

**2001 - 2007:**
Leiðari í íløgudeildini hjá Bank Nordik. Í hesum tíðarskeiðnum 1 ár hjá Nordea í Keypmannahavn, á teirra Markets deild, sum arbeiðir við íløgum í samstarvi við Føroya Banka/ BankNordik.

**2009 - 2011:**
Varaleiðari á Kredittdeildini og risk manager hjá Bank Nordic í hálvtannað ár.

**2011 - 2012:**
Risk Manager hjá Bank Nordic.

**1. januar 2013:**
Tók við stjórastarvinum í tryggingarfelagnum LÍV.

# Við tøkk fyri tað farna ynskja vit eitt eydnuberandi nýggjár



FAGRABERG



VESTURVÓN



STAPIN

JFK | 710 Klaksvík | Faroe Islands | Tel. 409900 | jfk@jfk.fo






# Fá upp til
# 32% í avsláttri

**Betri pensjón tryggjar tær eina munagóða samansparing, sum leggur lunnar undir eina framhaldandi vælferð, tá ið tú fert frá fyri aldur.**

- Vit samanseta pensjón og tryggingar eftir tínum tørvi
- Vit umsita tína pensjón við størsta vinningi fyri eyga
- Umvegis Netpensjón hevur tú fult gjøgnumskygni

**Savnar tú tryggingar og pensjón hjá okkum, kanst tú fáa upp til 32% í avsláttri.**





**Hevur tú spurningar, ella kundi hugsað tær betri frágreiðing, set teg í samband við okkum á 345 700 ella betri@betri.fo**

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Betri pensjón